Nr. 4 • Januar 2010

# MIÐ & MAGN



Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið

**ÚTGEVARI**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**
Eyðstein Djurhuus (ábyrgd).
Regin Nónstein.
Páll Hansen.
Jóan Petur Patursson.

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN kunnu boða frá hesum í teldupost til:
bladhald@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr. um árið; t.v.s. 4 bløð.

**ENDURGEVING**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**UMSITING**
Sp/fMEDIA
info@midogmagn.fo

**UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Føroyaprent | www.foroyaprent.fo

UPPLAG: 2.000




# Tá sjómenn verða viðfarnir sum brotsmenn

Ein vaksandi trupulleiki innan altjóða sjóvinnu er „Criminalizion of seafarer´s“. Hetta er millum annað, tá sjómenn verða fongslaðir ella afturhildnir fyri brot á ymiskar reglur og lógarásetingar í teimum londum, har skipini koma. Tey grovastu dømini kenna vit frá vanlukkum við umhvørvisdálking og tá rúsevnir eru funnin í lastini.

Sjálvt um tað er púra greitt, at hvørki skipari ella nakar av manningini er beinleiðis sekur í nøkrum álvarsomum brotsverki. So kemur tað ofta fyri at manningin verður afturhildin í áravís meðan málini verða kannað. Hetta verður gjørt fyri at kroysta reiðaríið ella tryggingarfelagið til at gjalda stórar bøtur og endurgjaldskrøv.

Tann sum eigur skipið, og tann sum hevur raksturin um hendi, eru ofta ikki sama felag. Tann sum eigur lastina, og tann sum hevur biðið um flutningin, eru ofta heldur ikki tann sami. So tann lættasti mátin, er at fara eftir manningini.

Sjómenn koma ofta úr fátøkum londum, sum hvørki vilja ella kunna hjálpa sínum borgarum. Heldur ikki hava teir nakað fakfelag at hjálpa sær. Flaggstaturin hjá skipinum vil sjáldan átaka sær at hjálpa til. Tí sagt verður, at hetta er eitt privat mál millum partar, sum einki hava við flaggstatin at gera.

IMO hevur samtykt nakrar vegleiðingar um hvørji rættindi sjómenn altíð skulu hava. Hesar nevnast „Guidlines on fair treatment of seafarer´s“. Millumlanda fakfelagsrørslan hjá sjómonnum ITF og IFSMA arbeiða miðvíst fyri, at hesar vegleiðingar skulu gerast bindandi fyri øll limalondini í IMO. Føroysku manningarfeløgini eru við í hesum samstarvi.

Málið um Skálaberg hevur víst, at vit eisini hava áhuga í, at rættindini hjá sjómonnum skulu virðast. Hetta mál bleiv loyst, tí nógvar góðar kreftir arbeiddu miðvíst fyri eini loysn. Tað eru mong sum hava sagt, at hetta tók alt ov langa tíð at loysa. Men í mun til nógv mál sum vit kenna til so gekk tað stak skjótt at fáa skip og manning leysa aftur. Vit mugu ansa eftir, at vit ikki gerast ov harðrend móti fremmandum sjómonnum, sum bróta reglurnar hjá okkum.

Nógv skip koma inn í okkara FAS skipan, hesi sigla um allan heim. Vit vita ikki frammanundan hvat kann henda fyri hesi skip og teirra manningar. Tí mugu vit øll, sum á ymiskan hátt vara av okkara sjóvinnu virka fyri, at grundleggjandi rættarstøðan hjá sjómonnum verður vard.

*Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið*

*Eyðstein Djurhuus ábyrgdarblaðstjóri*

# Innihaldsyvirlit





Tá sjómenn verða viðfarnir sum brotsmenn. . . . . . . 2

Uppisjóvarvirkið í Kollafirði fær enn ein kjans . . . . . 4

Vanlukkur kunnu altíð henda . . . . . . . . . . . . . . . . . 6

– Tað hjálpir at tosa um tað . . . . . . . . . . . . . . . . . 9

Aðalfundur Føroya Skipara- og Navigatørfelag . . . . . 10

Nýggi Tróndur í Gøtu um at vera liðugur . . . . . . . . 20

Maskinmeistarin í brennideplinum . . . . . . . . . . . . . 23

Grátt føroyskt flagg. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24

Kanning av viðurskiftum
– hjá sjófólki, sum sigla í øðrum londum . . . . . . . . . 26

Sporføri loysir praktiskan trupulleika. . . . . . . . . . . . 34

Nyttan av sporførinum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 35

Hátíðarhald og próvhandan í Vinnuháskúlanum . . . 36

Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum . . . . . . . . . . . . 38

Tíðindi frá Føroya Skipara-og Navigatørfelag . . . . . . 40

Nú er ferð komin á søluna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 42










# Uppisjóvarvirkið í Kollafi



*Aad de Jong, stjóri*

## Hollendsk fyritøka hevur sett sær fyri at fáa greiðu á um tað kann loysa seg at virka pelagiskan fisk í Kollafirði

*Tekstur: Ingi Samuelsen*

– Vit hava sett okkum fyri at brúka komandi mánaðirnar fram móti sumrinum til at finna útav, um tað ber til at hava eina lønandi vinnu her. Um tað ikki ber til, so eri eg bangin fyri, at dagarnir hjá fabrikkini her eru taldir. Ber tað til, ja so er tað bara gott – serliga fyri Føroyar.

Soleiðis sigur hollendarin Aad de Jong, ið stendur á odda fyri pelagiska fiskavirkinum í Kollafirði, ið nú ber navnið Faroe Pelagic.

Fríggjadagin 30. november 2009 undirskrivaði hann vegna hollendska felag sítt Parlevliet & Van der Plas eina leiguavtalu við Eik Banka, ið eigur virkið í Kollafirði.

Fáar dagar seinni, mikudagin 9. desember, stevndi Fagraberg inn á Kollafjørð við fyrstu lastini til nýggja virkið. Fagraberg landaði góð 400 tons av svartkjafti undan Føroyum.

### Altjóða fyritøka

Parlevliet & Van der Plas, eisini kallað PP-Group, er eitt hollendsk virki, sum nú meira at kalla er ein altjóða fyritøka. Upprunin er fiskivinna og skiparakstur, men fyritøkan eigur eisini fleiri virkir, og hevur eina umfatandi marknaðar- og søludeild við kundum kring allan heim.

Sambandið til Føroyar kom ígjøgnum JFK við tað at føroyska og hollendska fyritøkan samstarva um skipið Næraberg. Saman við Hanusi Hansen stjóra, hevur PP-Group stovnað eitt føroyskt felag, sp/f P.P. Faroe Pelagic, sum hevur leigað virkið í Kollafirði frá Eik Banka, fyribils í eitt ár.

### Ov lítil frystiorka

Aad de Jong hevur stórar vónir til virkið í Kollafirði. Tá Mið&Magn vitjaði, var framleiðslan júst farin í gongd, og tískil vóru fleiri spurningar enn svar á skrivstovuborðinum hjá stjóranum.

– At byrja við heilfrysta vit rundan fisk. Í dag er tað svartkjaftur, men tað kundi eins væl verið sild ella makrelur. Seinni fara vit so eisini at fáa gongd á flakaskeringina av sild, greiðir Aad de Jong frá.

– Trupulleikin í løtuni er, at vit bert hava frystikapasitet til at virka millum 400 og 450 tons um samdøgrið. Hetta er í minna lagi. Vit skuldu helst tvífalda hesa mongd. Um vit ikki klára at taka ímóti meira, so verða vit ikki áhugaverd fyri skipini, tí tá verður




*Fagraberg landar til Kollafjarðar Pelagic*

# rði fær enn ein kjans

landingartíðin ov long, greiðir fryntligi hollendarin frá.

– Tað hongur jú saman. Skipini fara hagar, sum tey fáa tann besta prísin. Men prísurin má eisini standa mát við hvussu langt tað er at sigla, og hvussu nógvar fiskidagar skipið missir í ferðing og landingartíð.

– Okkara uppgáva er at kunna geva skipunum ein so mikið góðan prís og skjóta tænastu, at tað ikki loysir seg hjá teimum at fara til Skotlands ella Noregs við lastini, sigur Aad de Jong.

## Skeivar avgerðir

Tað er ein sannroynd, at tað hevur gingið ómetaliga illa at fáa gevandi rakstur í stóra pelagiska virkið í Kollafirði, sum upprunaliga varð bygt av eini aðrari stórari hollendskari fyritøku, Kloosterboer, sum stutt frammanundan hevði bygt eitt sokallað frystihotell á nýggju havnini í Kollafirði. Kloosterboer rekur framvegis „hotellið“ í tøttum samstarvi við Samskip.

– Tað er nokk einki at ivast í, at tað vóru nakrar skeivar avgerðir, sum vórðu tiknar í sambandi við, at hetta virkið varð etablerað. Tað vita vit í dag. Tað eydnaðist jú ongantíð at fáa upprunaliga frystaríið í framleiðslu, og seinni varð eitt annað frystarí installerað her. Tað er tað, vit nú brúka, og sum kann innfrysta millum 400 og 450 tons um samdøgrið, sigur Aad de Jong.

– Treytin fyri at fáa rakstur í virkið er at fáa økt frystikapasitetin. Tí fara vit at brúka teir komandi mánaðirnar til at kanna hvat skal til fyri at fáa frystaríið at koyra betur.

– Eg havi ongar forvæntningar um, at tað er nøkur einfald loysn upp á trupulleikan. Tað er týðuligt, at upprunaliga frystaríið hevur brek. Tað virkar snøgt sagt ikki. Kanningarnar skulu nú vísa um tað loysir seg at bøta um tað frystaríið ella um tað skal skiftast heilt út, sigur Aad de Jong.

## Hava royndirnar

Hollendski virkisleiðarin er sannførdur um, at hann og hansara fyritøka hava betri møguleikar fyri at fáa skilagóðan rakstur í virkið í Kollafirði enn landsmenn hansara, sum upprunaliga bygdu tað.

– Kloosterboer eru dugnaligir á sínum økjum. Tey arbeiða við goymslu og logistikki innan matvørur av ymsum slag. Tey hava ikki royndir við fiskivinnu, við fiskaframleiðslu og sølu av fiski. Tað hava vit, sigur Aad de Jong.

– PP-group byrjaði í 1949 sum ein fiskivinnufyritøka. Vit hava drúgvar royndir. Vit vita hvørji krøv skipini seta, vit vita hvussu fiskur skal hagreiðast fyri at fáa bestu virðisøking, og vit hava royndir við sølu, og kenna marknaðirnar kring allan heimin.

– Um somu tíð sum Kollafjord Pelagic varð bygt, bygdu vit okkara stóra fiskavirki, Euro-Baltic, á týsku oynni Rügen. Eg minnist væl, at eg tosaði við umboð fyri Kloosterboer tá. Teir greiddi okkum frá frystaríðinum, sum teir høvdu keypt til virkið í Føroyum, og meintu, at tað var betri, enn tað, sum vit settu í Euro-Baltic. Tað mettu vit ikki, og vit fingu rætt, sigur Aad de Jong.

## 50 fólk í arbeiði

Hollendarin er fegin um at hava fingið møguleikan at etablera eitt pelagiskt virki í Føroyum. Fyribils eru tað umleið 50 fólk, sum arbeiða á virkinum, sum framleiðir í tveimum skiftum.

At byrja við er bert talan um rundfrysting í blokk, men seinni er eisini ætlanin at flakaskera sild.

Eg vóni, at vit fáa tað at koyra, og tá hetta er komið upp at koyra, er ætlanin, at virkið skal vera mannað við føroyingum burturav. Kemur hetta at koyra, verður tað gott fyri okkum, men sanniliga eisini gott fyri føroyska samfelagið, ið fær betri og fjøltáttari møguleika at fáa meira burtur úr ríkidøminum, sum liggur í pelagisku fiskastovnunum kring Føroyar, sigur Aad de Jong, sum eisini sær fram til møguligan at kunna gera brúk av føroyskari serfrøði í sambandi við nýggjar ætlanir og avbjóðingar hjá Parlevliet & Van der Plas kring heimin í framtíðini.

*Tveir skiparar eru við Fagraberg, Jógvan Hentze og Høgni Hansen*



# Vanlukkur kunnu altíð



# henda




Tummas Justinussen

## Hjá reiðarínum ræður um at vera til reiðar og vita hvat skal gerast, tá boð koma um óhapp og vanlukkur

*Tekstur: Ingi Samuelsen*

Tað er av týdningi fyri eitthvørt reiðarí at vera tilvitað um, at óhapp kunnu altíð henda, og tá tey so henda, so er umráðandi, at fólkið á sjógvi og landi veit, hvat tey skulu gera.

Mið og Magn hevur tosað við reiðaran Tummas Justinussen fyri at frætta nærri um hvussu tey í reiðarínum Sjóborg upplivdu tað, tá ein maður kom til skaða og doyði umborð á Polarhav.

At hava greiniligar tilbúgvingarætlanir liggjandi klárar er als ikki ókent fyri útgerðarfelagið í Leirvík. Felagið er í oljuvinnuni við nýggja stásiliga supplyskipinum Eldborg, og tað er ein rættiliga umfatandi tilbúgvingarætlan, ið skal standa klár fyri at kunna vera við í teirri vinnuni.

### Endi sleit

Sjálvur var Tummas Justinussen staddur í Fjareystri, tá boðini um óhappið umborð á Polarhav komu kl. 18.13 hóskvøldið 12. november, so tað var Osmund Justinussen og sonur hansara Helgi, sum gjørdu tær neyðugu uppringingarnar meðan tað stóð harðast á og tímarnar aftaná.

Polarhav og Stjørnan partrolaðu eftir upsa á Munkagrunninum, tá vanlukkan hendi. Í samband við at Polarhav skuldi taka veirin yvirum frá Stjørnuni, slitnaði ein endi, og eitt jarnlás rakti stýrimannin í síðuna.

Avgjørt var beinanvegin at stima móti nærmastu havn, sum er Vágur. Tað var ikki gjørligt at fáa tyrlu eftir manninum, og stutt áðrenn Polarhav kom á Vág, kundi manningin staðfesta, at stýrimaðurin, Hilbert Martin Blástein var deyður av løstunum hann fekk fýra dagar undan sínum 30 ára føðingardegi.

### Sálarliga hjálp

Tað sigur seg sjálvt, at hetta var ein skelkandi uppliving fyri manningina, og reiðaríið setti sær beinanvegin fyri, at geva monnunum umborð á bæði Polarhav og Stjørnuni ta neyðugu sálarligu hjálp beinanvegin.

– Vit góvu skipunum boð um, at eingin fór í land í Vági og at eingin óviðkomandi kom umborð har. Avrátt var saman við skiparanum at seta kós móti Runavík, haðani skipini verða útgjørd. Vit góvu teimum boð um at taka tað so mikið róligt, at teir ikki vóru frammi fyrr enn til arbeiðstíð morgunin eftir, greiðir Tummas Justinussen frá.

– Við góðari hjálp frá politinum og frá Marine Service, ið tekur sær av dagliga viðlíkahaldinum fyri okkum, varð syrgt fyri, at sálarfrøðilig kreppuhjálp stóð fyri teimum eins og sjómanstrúboðarin, Torleif Johannesen, var til staðar fyri at tosa við teir, ið ynsktu tað.

> **Tað er av týdningi, at menninir – eisini teir á Stjørnuni – fingu tosað út um tað, ið hent var áðrenn teir sluppu í land.**

## ” vit klára ongantíð at tryggja okkum ímóti at óhapp ikki kunnu henda

– Tað er av týdningi, at menninir – eisini teir á Stjørnuni – fingu tosað út um tað, ið hent var áðrenn teir sluppu í land. Vit vildu eisini gjarna hava, at ein skrivlig frágreiðing av hendingini varð gjørd áðrenn menninir fóru hvør til sítt.

– Áðrenn skipið kom á Runavík høvdu vit sjálvandi eisini tryggjað okkum, at familjan, bæði tann á Viðareiði, har stýrimaðurin búði, og tann í Vestmanna, haðani hann var ættaður, høvdu fingið boð um hvat hent var. Tað hevði løgreglan syrgt fyri.

### Vilja kenna orsøkina

– Fyri okkum sum útgerðarfelag hevur tað sjálvandi eisini týdning at kanna hvat tað var, ið hendi, og um okkurt kundi verið gjørt, ið kundi havt forðað fyri, at óhappið fekk slíkt vanlukkuligt úrslit.

– Nú er tað soleiðis, at vit koyra við eini sokallaðari PMS-skipan, har øll arbeiði og útskiftingar av tekniskum slag verða skrásett. Vit kundu sostatt beinanvegin staðfesta, at tað ikki kundi vera orsaka av tering, sliti ella elli, at óhappið hendi. Hetta skal ikki skiljast so, at eg royni at frásiga reiðarínum ábyrgd. Men um okkurt var, ið kundi verið gjørt øðrvísi, so skuldi tað verið rættað beinanvegin. Vit hava ta áskoðan, at hendir eitt óvæntað óhapp, so fer eingin til songar fyri enn vit hava gjørt alt fyri at kanna orsøkina til óhappið, sigur Tummas Justinussen, og heldur fram:

– Sum eg havi fingið forklárað hendingina, so var tað eitt óhapp, sum vit ikki kundu havt fyrireikað okkum uppá. Sannlíkindini fyri, at júst hasin endin skuldi slitna, er ógvuliga lítil. Men tað hendi so. Endin var komin í eina fløkju, og helst er tað tann skammfíling, endin hevur fingið í fløkjuni, sum er orsøkin til, at tað brast. Trýstið á endanum var einki serligt í mun til tær kreftir, sum menn eru vanir við á trolaradekki.

Manningin á dekkinum á Polarhav bera allir trygdarhjálm og vest. Tummas Justinussen roknar ikki við, at meira persónlig trygdarútgerð hevði gjørt frá ella til í hesum føri.

### Hjálp til avvarðandi

– Tá menninir so vóru farnir til hús, fóru vit undir at taka okkum av ymsum praktiskum tingum.

– Men vit fóru eisini beinanvegin at kanna tryggingarumstøðurnar hjá manningini og hjá okkum. Vit bjóðaðu eisini einkjuni at taka okkum av øllum samskifti við trygging, lívstrygging og peningastovn, soleiðis at familjan ikki skuldi hava tað stríðið afturat øllum øðrum. Vit eru von við at samskifta við slíkar stovnar, og tað er vónandi ein lætti hjá eftirsitandi familjuni at sleppa undan at hava tað at dragast við eisini undir slíkum umstøðum.

### – Hav tryggingarnar í lagi

Spurdur um hvat reiðaríið Sjóborg hevur lært av hesi hending, svarar Tummas Justinussen, at tað altíð er okkurt at læra.

– Eitt hava vit so lært, og tey ráð vil eg fegin geva víðari: Syrg fyri at hava tryggingarnar í lagi, og eftirkanna tær við jøvnum millumbilum. Vit ráða altíð okkara monnum at tekna sína egnu trygging eisini. Vit hava vanliga kollektiva trygging fyri manningarnar á skipunum, men best er um teir einstaku menninir eisini hava sína egnu trygging. Eftir vanlukkuna á Polarhav hava vit sett okkum fyri, at manningin minst eina ferð um árið fær sendandi eina kunning, har greitt verður frá teirra tryggingarviðurskiftunum.

– Vit vita jú, at troldekkið er eitt av vandamiklastu arbeiðsplássum yvirhøvur, og tá ræður um at vera tryggjaður væl, tí vit klára ongantíð at tryggja okkum ímóti at óhapp ikki kunnu henda, sigur Tummas Justinussen, sum eisini vísir á tørvin á, at manningin umborð á skipunum altíð – óansæð tíð á samdøgrinum – hevur møguleika at koma í samband við fólkið í landi, og at umsitingin á reiðarínum er girað til at taka skjótar og rættar avgerðir, tá vanlukkur ella óvæntaðir krepputilburðir taka seg upp.

### EITT SINDUR UM SKIPIÐ „POLARHAV“



*Polarhav er bygdur í Íslandi í 2004.*
*Manningartal: 7*
*Maskinorka: 662 kW/900 HK, Mitsubishi, 6 s, 41*
*BT: 425,00. NT: 128,00. Klassi: DNV.*

# - Tað hjálpir at tosa um tað

## Krepputilbúgvingin er til reiðar við sálarligari fyrstuhjálp tá tað er neyðugt

*Tekstur: Ingi Samuelsen*

– Vit standa til reiðar at fara út um tað gerst brúk fyri okkum.

Tað staðfestir Jógvan Jensen, sum gjørgnum felag sítt, sp/f Tilbúgvingarstovan, samskikpar krepputilbúgvingina í Føroyum saman við Johannis Nilssen og felag hansara sp/f Brák.

– Vit samskipa alla heilsutilbúgvingina, sum liggur uttan fyri sjúkrahúsverkið. Tað vil siga, at vit hava ein umfatandi lista yvir serkøn fólk, sum hava stillað seg til reiðar at fara út at hjálpa um ein størri vanlukka skuldi hent.

– Ein umfatandi partur av hesi tilbúgving umfatar eisini sálarliga fyrstuhjálp. So tá vit gjøgnum alarmsentralin fingu at vita, at ynski var um at fáa fatur á fólki at tosa hendingina ígjøgnum í sambandi við vanlukkuna umborð á Polarhav, so vóru vit klár beinanvegin, sigur Jógvan Jensen.

Jógvan vísir á, at talan ikki er um sálarfrøðiliga viðgerð í slíkum føri.

– Tey, sum fara út eru fólk, ið duga at tosa við menniskju, ið hava verið fyri einum ógvusligum tilburði. Okkara fólk hava royndir og hava tikið fleiri skeið í at geva sálarliga bráfeingishjálp. Tað umráðandi er, at halda samtaluna í gongd, at fáa fólkini at tosa um tað, ið er hent. Fólki, ið hava verið úti fyri einum sálarligum skelki eiga ikki at fara heim til sín sjálvs við upplivingunum uttan at hava tosað tingini ígjøgnum áðrenn, sigur Jógvan Jensen

### Tagnarskyldu

– Okkara fólk duga eisini at meta um fólkini hava brúk fyri serkønari hjálp ella beinleiðis sálarfrøðiligari viðgerð. Vit hava so møguleikan at skapa neyðuga kontaktina hesum viðvíkjandi.

– Ofta er trupult hjá fólki at tosa út um tingini, serliga tá talan er um vanlukkur, har løgreglan er blandað uppí, og ein skuldarspurningur skal staðfestast. Her er tað av stórum týdningi at greiða fólki frá, at tað, sum tey siga við okkum á ongan hátt kann brúkast av politinum. Einki verður skrivað niður, og vit kunnu ikki brúkast sum vitni í eini møguligari sak. Tá talan er um at veita sálarliga kreppuhjálp er tað av týdningi, at tey raktu kunnu tosa frítt uttan ótta fyri, at tað tey siga, kann verða brúkt móti teimum aftur seinni, sigur Jógvan Jensen.

### Debriefing

Tey kalla tað „debriefing“ tá fólk fara út at „tosa tingini ígjøgnum“ við fólk, sum hava verið úti fyri ógvusligum tilburði.

Krepputilbúgvingin veitir hjálp vanliga fleiri ferðir um árið. Millum annað við at tosa við avvarðandi, ið hava mist í vanlukku, men eisini at tosa við tey fólkini, sum hava verið við í bjargingini, og hava brúk fyri at tosa um tað við onkran.

– Vit verða eisini send út í sambandi við hendingar, sum kortini ikki gjørdust til vanlukkur. At koma fyri eina „nær deyðanum”-hending, kann vera trupult at handfara. Hóast vanlukkan ikki hendi, missa fólk svøvnin, tí tey uppliva hendingina umaftur, greiðir Jógvan Jensen frá.

Ein av hesum „næstan-vanlukkunum“ var tá ferðamannaskipið Norrøna í 2008 fekk black-out í illveðri í Norðsjónum.

– Tá sendu vit fólk umborð at „debriefa“ hendingina við bæði ferðafólk og manning. Talan var um fleiri hundrað fólk, ið ynsktu at fáa eina slíka „debriefing“. Hóast einki hendi, var upplivingin ógvuslig fyri nógv av teimum, sum vóru við, sigur Jógvan Jensen.




*Jógvan Jensen*

# Aðalfundur Føroya Skipara-

Aðalfundur Føroya Skipara- og Navigatørfelag var á Hotell Tórshavn, týsdagin 29. desember 2009 við hesi dagsskrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing formansins um virki felagsins í farna ári
3. Framløga og støðutakan til roknskapin
4. Val av nevndarlimum
5. Val av grannskoðara og tiltaksmanni
6. Ásetan av limagjaldi
7. Ymiskt

Tommy Petersen, stjóri á FAS, var gestarøðari.

## FORMANS-FRÁGREIÐING 2008

Nú enn eitt ár er um at verða liðið, skal formaður felagsins aftur leggja fram frágreiðing um, hvat FSN hevur arbeitt við seinasta árið. Eisini er neyðugt at koma inn á útlit og avbjóðingar, sum standa fyri framman.

### Skrivstovan og nevndararbeiði

Umleggingar í samlagstryggingini og eftirlønini hava ført til nakað av eyka arbeiði fyrst í árinum. Innkrevjing av hýrueftirstøðum og uppsagnarløn, er ein alsamt vaksandi partur av okkara arbeiði. FSN hevur fingið allan pengingin inn aftur, sum varð lagdur út fyri hýrueftirstøður í 2008. Fleiri sakarmál eru endað í ár. Trygdirnar, sum FSN hevur sett fyri sjópant, eru nú leysgivnar aftur.

Nevndin hevur verið regluliga saman til fundir, eisini hava nevndarlimir verið innkallaðir til samráðingar og aðar fundir. Eitt av endamálinum við, at formaðurin er í føstum starvi hjá felagnum, er at lætta um arbeiðsbyrðuna hjá nevndarlimunum.



# og Navigatørfelag





*Nevndarlimir frá vinstru: Annfin Garðalíð, Jákup Gøthe, Jan Kristoffersen, Ólavur Biskupstøð.*

> **Veikleikin við verandi lønarhátti er, at skiparar og stýrimenn formelt eru í starvi, tá skip liggja í longri tíð.**

### Krepputiltøk

Fíggjarvánirnar eru sum heild versnaðar seinasta árið og stórt hall er í almennu kassunum. Lagt hevur verið eftir sjómannafrádráttinum, inntøkutrygdini og DIS nettolønunum. FSN hevur gjørt vart við seg í almenna orðaskiftinum, tá okkara grundleggjandi fortreytir hava verið umrøddar. Vit hava roynt at grundgivið sakliga fyri okkara sjónarmiðum. FSN tekur ikki støðu til politiskar spurningar um, hvussu vit frægast skipa okkara samfelag.

Ein spurningur, sum ofta kemur upp er, hvussu stórur skal okkara fiskiskipafloti vera. Fleiri eru sum siga, at vit hava ov nógv stál, men ov fáar stertar at fiska. FSN metir, at eitt hóskandi fiskidagatal og skipatal, eigur at kunna vera ásett út frá søguligum veiðihagtølum.

Um niðurstøðan er, at ov nógv skip veiða á Føroyagrunninum, so er vert at hava í huga, at hetta fyri tað mesta eru gomul og niðurslitin skip. So við tí røttu politisku umsitingini, kann hesin trupulleiki allarhelst loysa seg sjálvan, innan stutta tíð. Umráðandi er at forða fyri, at onnur ótíðarhóskand skip koma inn fyri tey gomlu, sum skjótt verða løgd.

### Sáttmálin fyri fiskiskip

Sáttmálin kundi sigast upp, til at fara úr gildi, við ársskiftið. Nevndin avgjørdi ikki at siga upp hesiferð. Reiðarafelagið segði heldur ikki upp. Eftir stuttar samráðingar, hava Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið avgjørt at leingja sáttmálan óbroyttan. Hetta sigur nógv um støðuna, sum okkara fiskifloti er í. Tað er ikki so frægt, at tað loysir seg at royna at fáa ábøtur í sáttmálan.

Seinastu árini er flotin farin frá eini kreppu til aðra. Fyrst var tað oljuprísurin, og so fall fiskaprísurin. Rokningin fyri spekulatión við fiskiloyvum, er framvegis ikki goldin. Ovurhonds stóra lánibyrðan tyngir vinnuna sera nógv.

Tíðin er helst komin, til eina munandi nýmótansgerð av setanar- og lønarviðurskiftum innan fiskiskipasáttmálan. Kappingin frá altjóða farma- og frálandaskipum, ger tað alsamt minni áhugavert at taka hýru við einum fiskiskipi. Ein góð jøvn mánaðarløn, pensjón, skipað frítíð og áhaldandi eftirútbúgving, hava stóran týdning, tá ungir navigatørar velja sær starv. Fiskiskipaflotin hevur higartil kunna kappast uppá lønarlagið, men nú eru hýrurnar í øðrum vinnum, um at fáa fiskiskipini aftur.

Um vit skulu í gongd við at gera aðrar sáttmálar enn teir, sum vit í dag kenna, við fiskiparti og eykapørtum, so mugu vit hava í huga, at inntøkumøguleikarnir eru sera ymiskir og skjótt skiftandi í hesi vinnu. Tað kann væl hugsast, at vit í framtíðini fáa ymiskar mátar at løna yvirmonnum í teimum ymisku skipabólkunum.

Veikleikin við verandi lønarhátti er, at skiparar og stýrimenn formelt eru í starvi, tá skip liggja í longri tíð. Tá skipið onki avreiðir, er sjálvandi ongin løn at gjalda út. Tað munnu vera fá húsarhald, sum kunnu klára seg uttan nakra inntøku í fleiri mánaðir. Um FSN skal arbeiða fyri einari garantihýru, so kann væntast, at okkurt verður kravt aftur fyri, eitt nú í býtisprosenti ella eykapørtum. Eitt mugu vit gera púra



*Nevndarlimir frá vinstru: Regin Nónstein, Leif Joensen, Johannus Jacobsen, Eyðstein Djurhuus, Ellintur Abrahansen.*

greitt, at ein garantihýra ikki er á minstulønar- ella ALS støði, tá tosa vit um heilt aðrar upphæddir.

Í ólavsøkupakkanum varð samtykt, at partarnir sjálvir skulu yvirtaka og gjalda fyri inntøkutrygdina. Ein arbeiðsbólkur er settur at gera landsstýrismanninum eitt tilmæli. FSN er umboðað í bólkinum. Vit meta, at hetta nokk er mest eitt mál hjá Fiskimannafelagnum og Meginfelag Útróðrarmanna. Okkara uppgáva kundi verið at bakka hesar upp.

## Farmaskip

Nýggjur tvey ára sáttmáli fyri farma- og frálandaskip varð gjørdur í mars mánaði. Hýrurnar hækkaðu við 3,22% hvørt árið. Daglønirnar fyri smærru skipini hækkaðu 7%. Eisini komu hækkingar í yvirtíðarviðbótunum hjá bólki 1,2 og 3.

Broytingin í FAS skattinum, hevur gagnað teimum hægru lønunum mest. Tí løgdu vit okkum eftir at fáa eitt sindur meir, enn lønarkarmin á teir lægru lønarflokkarnar.

Nakað av óvissu hevur verið um eftirlønarinngjøld hjá teimum, sum hava FAS inntøku. TAKS loyvir ongum frádrátti í FAS inntøkum. Hetta er fyri, at skipanin skal vera útreiðsluneutral fyri landið. Manningarfeløgini hava tí gjørt eitt ískoyti til okkara eftirlønarsáttmála fyri FAS inngjøld. Hesi fara nú inn til eina uppsparing við skattaðum inngjaldi og skattafríum útgjaldi. Skatturin er í báðum førum 35%, so limir okkara missa onki við hesi skipan.

Nakrir limir hava sagt, at tað er ov nógv at inngjalda 7% av skattaðum peningi, og summir hava ikki fult álit á, at peningurin fæst skattafríður út aftur. Tí hava vit saman við LÍV avgjørt, at skipanin kann fráveljast. Hetta merkir, at eftirlønarparturin kann í samráð við reiðaran, útgjaldast sum vanlig inntøka. FSN vil tó mæla til, at uppspart verður til pensjón.

Farma- og frálandavinnan hava eisini merkt alheims fíggjarkreppuna. Raturnar eru lækkaðar, samtundis er virksemið eisini minkað. Tíverri eru skip løgd og manningar uppsagdar. Hetta eru viðurskifti, sum vit einki fáa gjørt við. Vit mugu bert góðtaka, at hetta er tann veruleiki, sum nú einaferð er galdandi.

FSN er ikki partur av Fasta Gerðarrættinum, men vit hava lagt eina sáttmálatulking í farmaskipasáttmálanum fyri henda rættin. Spurningurin, um hvørt uppspardir frídagar kunnu leggjast í uppsagnartíðina, skuldi svarast. Úrskurður bleiv avsagdur nú í desember og FSN fekk fult viðhald. Hetta merkir, at limir okkara eiga rætt til bæði uppspardar frídagar og løn í uppsagnartíðini. Vónandi skuldu vit fingið avgreitt tey sakarmál, har hetta hevur verið høvuðsspurningurin.

## Sáttmálar við tað almenna

FSN hevur umleið 50 limir, sum starvast hjá landinum og kommunum. Saman við øllum feløgunum á almenna arbeiðsmarknaðinum, vrakaðau vit uppskotið um at strika lønarhækkingina, sum kom í oktober mánaði. Lønarlagið hjá navigatørum hjá tí almenna er, longu sum nú er, nógv afturútsiglt í mun til privata arbeiðsmarknaðin, bæði í Føroyum og serliga í mun til útlendska arbeiðsmarknaðin.

Strandferðslan (SSL) hevur seinastu tíðina, arbeitt við at leggja eina nógv skerda ferðaætlan. Tey hava sent okkum uppskot til nýggjar staðbundnar avtalur. Hetta eru avtalur, sum áseta eina lægri arbeiðstíð, enn sáttmálin sigur og hevur eina samsvarandi lægri løn. FSN, Maskinmeistarafelagið og Starvsmannafelagið hava einsljóðandi sáttmála fyri SSL. Feløgini hava í felag svarað, at vit ikki ynskja at gera nýggjar staðbundnar avtalur. Vit vænta, at SSL so heldur seg til sáttmálan, við fullari mánaðarløn og arbeiðstíð.





Neyvan er seinasta orðið sagt í hesum máli enn. Lagt varð upp til munandi niðurskurðir í lønini og eisini ynskti SSL, at broyta onnur viðurskifti, eitt nú við til- og frátørning.

Í desember í 2007 varð endurgjald fyri avspáking, fastar frídagar, goldið limum okkara hjá SSL. Tó vildi Lønardeildin ikki viðurkenna, at skiparar á Smyrli eisini áttu hetta endurgjald. FSN og Lønardeildin vóru samd um, at leggja málið fyri Gerðarrættin. Lønardeildin hevur nú broytt áskoðan og vil útgjalda upphæddina, um FSN viðurkennir, at hetta onga ávirkan fær á núverandi sáttmála. Hesum hava vit gingið á møti, so vónandi verður hetta avgreitt skjótt. Nevnast kann, at málið varð reist í 2004, so gott tol skal til fakfelagsarbeiði.

Ein onnur drúgv ósemja, er avtalan fyri tænastumenn hjá Fiskiveiðieftirlitinum. Hetta snýr seg um teir fimm eyka frídagarnar – ella 2,5%, sum øll á



almenna arbeiðsmarknaðinum fingu í 2003. Okkara tænastumenn fingu ikki hesa hækkan. Hetta hava vit ongantíð góðtikið og úrslitið er, at avtalan ikki er endurnýggjað síðan.

FSN hevur havt nakrar fundir við Lønardeildina og Fíggjarmálaráðharran. Tey hava flutt seg nakað. Nú hava tey boðið okkum tey 2,5% frá nú av, og fram eftir. Vit hava kravt, at tíðarskeið har limir okkara hava fingið ov lítið, eisini skal takast við í eini semju. Hetta hevur lønardeildin avvíst.

Vit hava biðið um, at Fíggjarmálaráðið leggur málið fyri Løgtingið, sum tænastumannalógin ásetur. Næsti leikur hjá okkum, er at kæra málið til Umboðsmannin. Tænastumenn kunnu sum kunnugt, ikki fara í verkfall, tí meta vit, at tað er sera álvarsamt, tá landsins myndugleikar ikki viðfara allar landsins tænastumenn eins.

## Trygging og pensjón

Við seinasta ársskiftið, tók Fiskimannafelagið seg úr samlagstyggingini og stovnaði aðra trygging hjá Alka. Fiskimannafelagið hevði fíggjarligu umsitingina av samlagstrygginini, vegna øll manningarfeløgini. Roknskapur yvir samlagstyggingina er gjørdur øll árini, vit hava havt hana í felag. Nú tann seinasti roknskapurin fyriliggur, skuldi verið klárt at gjørt upp og býtt ognirnar millum feløgini.

Nakrar broytingar eru gjørdar í samlagstyggingini. Upphæddirnar við deyða og hættisliga sjúku eru hækkaðar. Frítíðarvanlukkutryggingin er ikki við longur. Orsøkin er, at bert u.l. 8% av øllum óarbeiðsføri stavar frá vanlukkum. Tann gongda leiðin innan hetta øki, er at tekna eina óarbeiðsførisveiting, sum part av eftirlønarskipanini. Men inngjøldini mugu nokk hækka nakað meir, áðrenn hetta kann gerast.

FSN fær javnan fyrispurningar frá limum, sum ynskja at fáa sína eftirløn á kontu hjá øðrum veitarum enn LÍV. Nevndin hevur umrøtt møguleikan, fyri at gera eftirlønarsáttmála við fleiri veitarar. Kappingingin millum pensjónsfeløg er herd munandi, og tað er ikki okkara uppgáva at umsita pensjónspeningin hjá limunum. Í framtíðini mugu vit skipa soleiðis fyri, at tann einstaki sjálvur kann velja pensjónsfelag.

Pensjónsreformurin við skyldu til uppsparing, kemur í gildi 1. januar 2011. Longu nú er ætlanin, at lækka hámarkið fyri frádrátt fyri kapitaluppsparing við eini helvt. Eitt av endamálunum við reforminum, er at broyta uppsparingarhátt, frá kapitaluppsparing til lívslanga veiting.

Sum longu nevnt, so fáast ikki frádráttir í FAS inntøkum. Vit hava fingið váttað, at ein serskipan verður gjørd fyri FAS inntøkur.

## Vandamál

Í sambandi við syrgiligu arbeiðsvanlukkuna umborð á Polarhav, er komið undan kavi, at støðan innan tilbúgving á sjónum, ikki er nøktandi. Sum er, kann bjargingartyrlan takast úr flúgving í longri tíð, uttan at ein tilsvarandi tyrla verður sett inn í staðin. Manningarfeløgini hava tosað við Landsstýrismannin um hetta mál. Hann er samdur við okkum í, at her má okkurt munagott gerast skjótt.

Skálaberg, sum var afturhildin í



meir enn ein mánað, er tíbetur komin heimaftur í øllum góðum. FSN vil mæla til, at næsti fiskiveiðisáttmálin, sum gjørdur verður við Russland, kemur at hava greiðar ásetingar um, hvussu brot á reglurnar skulu handfarast av myndugleikunum í báðum londunum.

FSN hevur regluliga kunnað okkara altjóða sambond um gongdina í Skálaberg- málinum. Eitt slíkt mál kann bert loysast við politiskum trýsti. Tí hava vit fingið tey ráð, ikki at leggja okkum uppí málið og harvið gera støðuna enn spentari. Fiskivinnuavtalan við Russland er ein politisk avtala millum tvey lond og ósemjur kunnu bert loysast politiskt.

## Samstarv uttanlands

Navigatørkongressin hevur havt tveir fundir. Í Reykjavík í juni og í Århus í oktober. Ein skipsføraranæmingur var við til fundin í Århus. Altjóða fíggjarkreppan og avleiðingarnar hava verið eitt høvuðsevni á kongressunum. Sjóráninini við Eystur Afrika, hava eisini fingið nógva umrøðu.

Í februar 2010 fyllir Navigatørkongressin 100 ár. Dagurin verður hildin í Stokkhólm, á sama stað, sum felagsskapurin bleiv stovnaður. Várfundurin, sum annars skuldi verið í Føroyum, er fluttur til seinni. Ein minni bóklingur verður útgivin til hátíðardagin.

Vit vóru í juni mánað á fundi við donsku manningarfeløgini um, hvussu ein ger sáttmálar fyri útlendskar sjómenn, eftir altjóða standardi.

Í vár varð samstarvsavtala undirskrivað við Søfartens Ledere. Endamálið er, at bæði feløgini skulu veita limunum hjá hvørjum øðrum ávísar tænastur. Partarnir meta at hetta fer at geva FSN størri arbeiðsbyrðu, enn Søfarens Ledere. Sostatt fær FSN eina árliga peningaupphædd fyri hesar eyka uppgávur. Søfarens Ledere hevur 200 virknar limir í Føroyum og miðar ímóti, at fáa enn fleiri.

## Granskingarverkætlanin

Vit hava saman við Maskinmeistarafelagnum, fingið Granskingardepilin at gera eina kanning av, hvussu nógvir føroyskir sjómenn sigla við skipum úr øðrum londum. Eisini varð kannað, hvussu inntøkan er, og hvørja ávirkan, henda inntøka hevur á føroyska samfelagið.

Kanningin hevur skapt nakað av orðaskifti, og pástandirnir um, at hesir sjómenn ikki eru líka góðir borgarar sum øll onnur, eru tagnaðir. Um nøkur ár kundi tað verði áhugavert, at tikið kanningina uppaftur, fyri at fylgt





gongdini, og tá skuldi man tikið FAS inntøkurnar við.

## FAS

Tað sær út til, at FAS skipaskráin umsíðir hevur fingið vind í seglini. Tað eru serliga svensk reiðarí, sum koma til okkara. Svenska skipaskráin er ikki kappingarfør við aðrar skráir. Eisini eru bæði norsk og íslendsk skip undir okkara flaggi. Føroysk reiðarí hava eisini fingið nýbygningar í hesum árinum.

Føroyska flaggið er enn á gráa lista hjá Paris Mou. Hesin listi er eitt mát fyri, hvussu nógvir manglar eru við Port State Control. Tey lond, sum klára seg best, eru á hvíta listanum. Hetta er eitt sera eftirfarandi mát fyri, um talan er um eina kvalitets skipaskrá, ella ikki. Flestu manglarnir, sum føroysk



skip hava havt, eru av umsitingarligum slagi, so sum manglandi vinnubrøv og heilsuváttanir.

Tað er heilt avgerandi, at vit koma á hvíta listan skjótt, annars koma ikki fleiri skip í FAS og tey sum eru komin, rýma aftur. Líkasæla við skipsskjølum, kann koma at kosta dýrt.

Vit hava stóran áhuga í, at FAS skipanin hevur framgongd. Hetta fer at bøta nógv um okkara vinnumøguleikar, bæði umborð á skipunum, og eisini innan onnur størv, sum eitt virkið reiðarí- og shipping umhvørvi kann geva.

Vit mugu ansa eftir, at allar hurðar ikki verða latnar upp á víðan vegg. Innan altjóða sjóferðslu eru eisini tey, sum altíð leita sær eftir umstøðum, til at gera sum frægast. Hesi áhugamál halda ofta hánt um trygdarkrøv og rættin hjá manningini til virðiligar umstøður.

FSN heldur ikki, tað er rætt at seta fram krav um, at partur av manningini við FAS skipum, skal verða føroysk. Okkara sjómenn hava altíð kunnað siglt við skipun í øðrum londum. Tó vilja vit mæla til, at vit fáa eina aspirantskipan við FAS skipum. Eisini mugu reiðarí í FAS hjálpa til, tá føroyskir yvirmenn mangla siglingstíð, til at fáa vinnubræv.

Innan altjóða skipaskráir er siðvenja fyri, at fakfeløg úr heimlandinum hjá sjómanninum og úr flagglandinum, í felagsskapi gera lønaravtalu fyri manningina. Fakfelagið í flagglandinum krevur síðani eitt avgjald frá reiðarínum fyri hetta. Føroysku manningarfeløgini eru í gongd við at gera eina slíka skipan fyri FAS. Hetta kann blíva til eitt gott íkast hjá føroysku feløgunum.

## Mið og Magn

Limablað okkara hevur fingið góða móttøku. Blaðnevndin hevur sett sær fyri, at seta okkara vinnugrein í eitt gott ljós. Sjálvt um trupulleikar eru av ymiskum slagi, so eru flestu okkara stoltir av okkara arbeiði og samstarvið við okkara arbeiðsgevarar, er sum heild gott. Tað er ikki meiningin, at Mið og Magn skal brúkast til fakfelagspropaganda.

Hetta fyrsta árið hevur blaðarbeiðið kravt nógv av okkum. Eg skal takka blaðnevndini og Snæbjørn í Dali, samskipara, fyri gott tol og gott samstarv.

## Útbúgving

Stórur áhugi er bæði fyri skipara- og skipsføraraútbúgvingini. Tað er í løtuni bíðilisti fyri, at sleppa inn á skúlan. Í grannalondunum verða stórar upphæddir brúktar til lýsingarkampanjur fyri at økja um áhugan fyri sjóvinnuútbúgvingum. So her er eitt øki, har vit eru betur fyri, enn hini norðurlondini. So er bert at vóna, at neyðugi peningurin verður settur av til skúlarnar.

Virksemið hjá Trygdarmiðstøðini verður nú skipað innan lógarverkið, soleiðis at hesin stovnur kann veita trygdarskeiðini fyri ein sámiligan prís, uttan at bróta kappingarlógina. Nýggj og betri høli, verða eisini keypt til stovnin í nærmastu framtíð.

FSN harmast um, at privati skeiðsdepilin CMM, allarhelst noyðist at leggja virksemið niður. Skeið, sum kundu takast her heima, mugu nú takast í útlondum.

## Útlit og avbjóðingar

Seinastu árini hava vit sæð eina minking í limatalinum í fiskiskipaflotanum. Tað er einki, sum bendir á, at størvini verða fleiri á hesum øki, komandi árini. Framgongdin í limatalinum innan farma- og frálanda sigling, er steðgað seinasta árið. Hetta er helst ein avleiðing av fíggjarkreppuni, so vit vóna, at gongd kemur á aftur skjótt. Føroysk reiðarí hava stórar ætlanir, um at fáa fleiri skip við føroyskari manning.

Sjálvt um fiskiflotin er í minking og siglir frá einari kreppu í aðra, so er alneyðugt at fáa modernisera setanar- og lønarviðurskiftini. Tað er ikki nøkur sjálvfylgja, at allir umborð skulu hava somu setanartreytir. Vanliga hava

> **Sjálvt um fiskiflotin er í minking og siglir frá einari kreppu í aðra, so er alneyðugt at fáa modernisera setanar- og lønar-viðurskiftini.**

yvirmenninir eitt tættari tilknýti til skip og reiðarí.

Vit vita nú, at alsamt størri og størri partur av føroysku navigatørunum hevur starv í útlondum og sostatt ikki eru fevndir av okkara sáttmálaøki. Sum nú er, eru nógvir av hesum hvílandi limir hjá okkum. Vit mugu nokk endurskoða hugtakið, hvílandi limir soleiðis, at vit í okkara dagliga arbeiði eisini taka okkum av áhugamálinum, hjá hesum navigatørum.

Tað eru støðugt álop á teir fáu fyrimunir og serskipanir, sum sjómenn hava. Tað nýggjasta er, at sjómannafrádrátturin verður róptur ein strukturellur skeivleiki í samfelagnum. Nakað tað sama verður sagt um FAS skattin og DIS nettolønarskipanina. FSN fer at berjast manniliga ímóti hesum sjónarmiðum

Sjálvt um vit eru mitt í eini búskaparkreppu, sum á ymiskan hátt rakar allar okkara limir, so er ongin orsøk at missa mótið. Eftirspurningurin eftir fiskavørum fer bara at økjast, og harvið eisini prísurin. Góð tekin eru í sjónum um, at nú fer fiskiskapurin eftir toski at batna aftur. Virksemið innan farma- og frálandavinnu kemur upp aftur, innan stutta tíð. Allar forsagnir siga, at stórur mangul verður uppá navigatørar í komandi árum.

At enda skal eg takka øllum fyri góðan stuðul.

*Eyðstein Djurhuus,*
*formaður í*
*Føroya- Skiparafelag og*
*Navigatørfelag*



# Nýggi Tróndur í Gøtu um at vera liðugur

## Nýggjasta skipið í pelagiska flotanum, Tróndur í Gøtu, verður eftir ætlan handaður føroysku eigarunum 6. februar. Felagið, ið eigur skipið, eitur nú p/f Hvamm

*Tekstur: Ingi Samuelsen*

Um hálvan februar verður nýggi Tróndur í Gøtu klárur at fara til fiskiskap.

Nýggja stásiliga farið hjá gøtumonnum hevur seinasta hálvárið ligið í Skagen, har liðugtgeringararbeiðið hevur verið gjørt hjá Karstensens Skibsværft.

Skrokkurin varð bygdur í Gdynia í Polandi, og í august mánaða varð hann togaður til Skagen, har restin av arbeiðinum verður gjørt liðugt.

– Síðan skipið kom til Skagen hevur arbeiðið gingið eftir ætlan, og 6. februar 2010 er framvegis dagurin, har ætlanin er at skipið skal handast eigarunum, greiðir Dávid Jacobsen, tekniskur leiðari hjá p/f Varðanum í Gøtu frá.

Skipið er teknað av teknistovuni Vik og Sandvik á Stord í Noregi. Tvey føroysk feløg eru við til liðugtgeringararbeiðið í Skagen. Tað er El-Service á Skála, ið ger el-arbeiðið og tær flestu el-talvurnar til skipið, og Radio Service í Tórshavn, ið leverar og installerar elektronisku tólini á brúnni.

### Nýtt p/f-navn

P/f Varðin er móðurfelagið hjá feløgunum, ið eiga Finn Fríða, Trónd í Gøtu, Jupiter og Saksaberg. Til fyri stuttum æt hetta felagið p/f Vinnan, men tey hava broytt nøvnini á feløgunum, so at høvuðsfelagið nú eitur p/f Varðin, og felagið, ið byggir Trónd í Gøtu, hevur fingið nýtt navn, p/f Hvamm.

Dávid Jacobsen hevur síðan august mánaða fylgt arbeiðinum í Skagen nær. Tríggir mans frá felagnum í Gøtu hava verið í Skagen síðan august, og í desember komu tríggir afturat at hava eftirlit við arbeiðinum.

Um jólahøgtíðina varð skipið innanborða pakkað væl og virðiliga inn, so at málaraarbeiðið í maskinrúmum, pumpirúmum og øðrum tekniskum rúmum kundu gerast.

– Tað passaði so væl, at høgtíðirnar kundu brúkast til hetta arbeiði, tí tá málaraarbeiði stendur fyri, ber ikki til at gera so nógv annað umborð, segði Dávid Jacobsen, tá vit tosaðu við hann um nýggjársleitið.

### Royndarkoyrast

Fyrst í januar var ætlanin at fáa sett høvuðsmotorin í gongd, fyri síðan at fara tekniskan royndartúr seinast í januar. Ætlanin er eisini at fara ein túr at royna fiskireiðskapin, bæði trolið og nótina, áðrenn skipið skal handast eigarunum.

– Vit hava sum so einki at skunda okkum til júst nú, tí hetta er ikki hásesong fyri uppisjóvarfisk. Vit ætla tí at skipið og fiskireiðskapurin skulu vera væl og virðiliga royndarkoyrd, áðrenn vit fara til fiskiskap við nýggja skipinum, sigur Dávid Jacobsen.

### Byrjanin til ævintýrið

Nýggja skipið kemur í flotan í staðin fyri gamla Trónd í Gøtu, ið varð bygdur í 1986, og sum í summar varð seldur til eitt kinesiskt felag og innflaggað til Peru. Skipið, sum nú eitur Pacific Hunter, fiskar rossamakrel í Kyrrahavinum.

Tróndur í Gøtu kom í flotan um tað mundið, tá svartkjaftafiskiskapurin tók seg upp í Føroyum. Byrjanin var tung, og tað var eitt stríð at fáa rakstur í skipið tey fyrstu árini. Síðan hevur tað gingið betur, og Tróndur í Gøtu er grundarlag fyri stóra pelagiska reiðaravirkseminum, sum í dag liggur í felagnum p/f Varðin í Gøtu.

| Fakta um Tróndur í Gøtu | |
|---|---|
| Longd | 81,60 metrar |
| Breidd | 16,60 metrar |
| Dýbd (Main deck) | 7,20 metrar |
| Dýbd (shelter deck) | 10,00 metrar |
| Tonnaga | 3000 GT |
| Høvuðsmotorur: | |
| Wärtsila 12V32: | 6.000 kW |
| Hjálpimotorar: | |
| Wärtsila 6L20: | 1.110 kW |
| Wärtsila 8L20: | 1.450 kW |
| Wärtsila 300HS: | 300 kW |
| Ferð: | 17,5 kn |
| Lastievni: | |
| RSW-tangar: | 2700 m$^3$ |
| Oljutangar: | 900 m$^3$ |
| Feskvatn: | 60 m$^3$ |

# Skeiðskema 2010



| Nr. | Skeiðnavn | Dagar | DKK | jan | feb | mars | apríl | mai | juni |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ARPA skeið<br>ARPA Automatic Radar Plotting Aids | 4 | 8.900 | | | 1 | | 03 | |
| 2 | GOC (Generelt certifikat sum radiooperatørur) Nýtt<br>GOC General Operator Certificate (NEW) | 15 | 14.900 | | | | | | |
| 3 | GOC-endurnýggjan<br>GOC General Operatør Certificate, renewal of course | 7 | 7.000 | | | | 26 | | |
| 4 | LRC (Avmarkað radioskeið)<br>LRC Long Range Certificate | 7 | 8.900 | | | | | | |
| 5 | LRC við Inmarsat<br>LRC Long Range Certificate, with Inmarsat | 8 | 9.950 | | | | | | |
| 6 | Tankers Safety serskeið fyri olju- gas- og kemikaliutangakip<br>Tankers Safety, special course for oil-, gas- and chemical tankers | 5 | 6.800 | 11 | | | | | |
| 7 | Flutningur av vandamiklum farmi<br>Transport of dangerous goods in dry cargo ships | 3 | 5.400 | | | | 19 | | |
| 8 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)<br>Supplementary training in medical proficiency | 4 | 7.500 | 23 | 08 | 1<br>22 | | | |
| 9 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)<br>um prógvið er eldri enn 10 ár<br>Supplementary training in medical proficiency<br>When certificate is older than 10 years | 10 | 12.000 | | | 15 | | | |
| 10 | ECDIS (elektroniskt sjókort)<br>Course in Elektronic Cart Display Indication System | 4 | 8.900 | | 22 | | | 24 | |
| 11 | Endurnýggjan av vinnubrævi<br>Renewal of maritime training certificate | pr. dag | 1.500 | | | | 12 | | |
| 12 | SSO-skeið<br>Course for Ship Security Officers | 3 | 5.400 | | 8 | | | | |
| 13 | § 16-skeið<br>Working environment §16-course | 3 | 5.800 | | 1 | 8 | | | |
| 14 | Ketilpassaraskeið<br>Skeiðið verður 5 fylgjandi fríggjadagar<br>Course as Bolier Tender | 5 | 7.500 | 22 | | | | | |
| 15 | Eldsløkking umborð á skipi<br>STCW A-VI/1-2<br>Fire Fighting on board Ships | 3 | 5.650 | 11<br>18 | 08<br>22 | 1<br>15<br>22 | 12<br>26 | 10<br>31 | 14 |
| 16 | Endurtøku eldsløkking umborð á skipi<br>STCW A-VI/1-2<br>Refresher Course in Fire Fighting | 1 | 2.900 | 07 | 11 | 4 | 8<br>29 | | 03 |
| 17 | Sløkkileiðsla umborð á skipi<br>STCW A-VI/3<br>Advanced Fire fighting | 2 | 4.100 | 28 | 04 | | | | |
| 18 | Eldsløkking fyri skipsyvirmenn<br>Fire Fighting for Ships Officers | 5 | 9.750 | 25 | 01 | | | 03 | |
| 19 | STCW A-VI/1-2 & STCW A-VI/3<br>Sløkkiliðsfólk uttan sløkkibil<br>Advanced Fire fighting for Ships Officers | 5 | 8.650 | | | | | | |
| 20 | Sløkkiliðsfólk við sløkkibili | 10 | 17.300 | | | | | | |
| 21 | Brunaumsjónarmenn | 7 | 12.100 | | | | | | |
| 22 | Venjing fyri sløkkilið | 1 | 1.800 | | | 06 | | | |
| 23 | Eldsløkking og bjarging í tunlum | 3 | 7.000 | | | | | | |
| 24 | Grundleggjandi eldsløkking<br>(Fyri virkir, stovnar og einstaklingar) | 1 | 860 | | | | | | |

Vinnuháskúlin treytar sær rætt at avlýsa skeið, um ov fá eru tilmeldað.

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251
info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

KREA · TEL 60 80 80

# Við Vinnuhaldinum frá Posta fært tú enn betri tænastur

Við eini haldaraskipan vilja vit gera tað ómakaleyst fyri vinnuna at avgreiða síni postviðurskifti.

**Ringið til okkara**

um tit vilja hava meira at vita um nýggja Vinnuhaldið.



Elin Ellefsen **23 60 65**
elin@posta.fo

Arina Bischoff **23 60 60**
arina@posta.fo

## Nýggja Vinnuhaldið

Í næstum fer Posta at bjóða nýggjar tænastur til vinnuna í Føroyum. Tænastur, sum fara at gera tað lættari hjá vinnuni at senda og fáa brøv og pakkar, bæði her í Føroyum, men eisini, tá talan er um útheimin. Vit vilja, at tað skal vera ómakaleyst, trygt og bíligt.

Saman kalla vit nýggju tænastur okkara fyri Vinnuhald. Við Vinnuhaldinum tøma vit postsmogu tína og koma við postinum eina ella tvær ferðir um dagin, tá ið tað hóskar tykkum. Samstundis taka vit við okkum brøv og pakkar, sum skulu sendast.

**Í fyrstu atløgu fevnir Vinnuhaldið um:**

- Postsmogu
- Levering og heinting, eina ella tvær ferðir um dagin
- Skundtænastu – útkoyring her og nú

Posta er nýggja navnið hjá Postverki Føroya. Við hesum verður broytingartilgongdin frá almennum stovni til vinnurekandi tænastufyritøku staðfest í navni og útsjónd.

Posta

SENDISTOVAN

# Maskinmeistarin í brennideplinum

## Sam Vang



**Hvørja útbúgving hevur tú:**
Var liðug sum maskinsmiður í 1993, á Skála Skipasmiðju. Tók prógv í 1997 sum maskinmeistari.

**Verandi starv:**
Arbeiði hjá SEV á Sundsverkið sum maskinmeistari, havi verðið her í 8 ár.

**Hjúnafelagi:**
Sólvá.

**Børn:**
Rúni 3 ár og Bjarti 4 ár.

**Besta bók:**
Besta bók er ikki til. Men tað eru nógvar góðar bøkur. Mær dámar best fantasi sjangruna, tað vil siga Ringana harri, Harry Potter, Eragon, Phillip Pullman. Og framtíðarbókin hjá Gorg Orwell „1984“, um Big Brother, og bøkurnar hjá Jan Guliu, Tempulriddararnir.

**Nær fór tú fyrstu ferð til skips:**
Tað var í 1985; tá fór eg í praktikk í 8. flokki við einum trolara, sum æt Hamraberg. Eg var eina viku umborð.

**Longsti túrur til skips:**
Tað var við rækibátinum Ocan Castel, vit vóru burtur í 5 mánaðir. Vit byrjaðu í Eysturgrønland, og fóru so á Flemmiskapp.

**Hvørjum skipum hevur tú verði við:**
Hamraberg í praktikk eina vika, Tummas Nygaard, Sólborg. Havi verið við fleiri Kubatrolarum sum avloysari minnist bara navnið á tí eina heilt sikkurt; tað var Gorpur, tað kemst av, at eg var so stutt umborð á hinum skipunum, tá er lætt at blanda, tað vóru 8 skip, ið vóru líka. Eg havi eisini verið við Ocan Castle.

**Hvat er størsta avbjóðingin hjá einum maskinmeistara í dag:**
Tað er so nógv, ið er ein avbjóðing. Tað kann vera arbeiðsumhvørvið, avbjóðingin er eisini at halda kunnleikin á einum nóg høgum støði. Mín fatan er, at arbeiðsgevarnar ikki priotera tað í Føroyum, og har er faktisk eingin hjálp at fáa. Har er ein maskinskúli, Vinnuháskúlin, men har er einki skeiðvirksemi fyri maskinmeistarar. So ein kann siga, at vit fara í órøkt um vit vera verandi í Føroyum.

**Frítíðarítriv:**
Eg eri tað, ið verður kallað sports idiot. Í løtuni er tað renning og judo, havi róð kapp og vant Taekwondo. Eg eri føroyameistari í 5 km. renning. Oyggjaleikameistari í judo – 60 kg, og tvær ferðir Føroyameistari í kappróðri – 10 mannafør, tað var í 92 og 93.

Um tú hevur sæð ein mann runnið við eini kraftiga pannilykt á Kalbaksvegnum, so er tað eg. Renni til arbeiðis og heim aftur. Fíra flugur í ein smekk, transport, venjing, ein bil og tíð; so ein sleppur frá at venja 2 tímar um kvøldið.

Havi eisini tað brúna belti í judo, og eg ætli at taka tað svarta í nærmastu framtíð.

**Bilur:**
Mazda premacy.

**Telda:**
Imac.

**Besti sangur:**
Havi einki, sum er best. Í løtuni er tað bólkurin Nephew. Lurti mest, tá ið eg renni, so tað er mest harðan tónleik, sum eg lurti eftir; tað heldur tempoðið uppi, tað skal verða „go“ í.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:**
Tað er, tá ið tað gongst væl á arbeiðsplássinum sum ein er í holt við.

Rennitúrurin til arbeiðis ein góðan summar morgun. Og tá ið tað gongst væl hjá familju og vinum.

**Hvat kann øsa teg:**
Eg vil ikki siga, at eg øsi meg, tað er meira irritatión, men tað er kanska tað sama. Tað er, sum hjá teimum flestu, at avtalur ikki verða hildnar. Ella inn á meg sjálvan, sum til dømis, um eg byrji at sløsa við venjingini.

# Grátt føroyskt flagg



*Óla Hans Hammer Olsen skrivar:*

Føroyska flaggið er á gráa lista ParisMOU. Hetta hoyra vit ofta og mangur spyr hví so er? Hvat merkir so at føroyska flaggið er á gráa lista? Tað merkir stutt, at føroysk skip eru í somikið vánaligum standi, og sovorðið óskil í skipsskjølunum, at havnastatir undir havnastatseftirliti (Port State Control (PSC)) seinastu trý árini hava afturhildið 5 føroyskum skipum av tí, at tí at raksturin av skipinum er so illa fyriskipaður, at tey av eftirlitsmonnunum verða mett at vera ein hóttan móti heilsu, umhvørvi og trygd á sjónum.

PSC er eftirlit, sum havnastatir, sum hava undirskrivað ParisMOU skulu gera av minst 25 % av fremmandu skipunum, sum koma teirra havnir. PSC verður gjørt av skipaeftirlitsmonnum. Tað verður kannað um skipið lýkur krøvini, sum sett eru í altjóðareglugerðum. Lýkur skipið tær ikki, verður tað viðmerkt í frágreiðingini um eftirlitið. Einstøk av reglukrøvunum geva eftirlitsmonnunum rætt til at afturhalda skipinum, eru tey ikki lokin. Talan er í hesum sambandi tó bert um altjóða krøvini. Verður eitt skip afturhildið, mugu brekini, sum eru ávíst umvælast, áðrenn skipið sleppur at sigla aftur. Verður eitt skip afturhildið nóg ofta í eitt nú ES havnum, kann tað fáa forboð at sigla til ES havnir.

Altjóða reglur verða lýstar av Skipaeftirlitinum at galda fyri føroysk skip í altjóða sigling. Regionalu ES reglurnar eru galdandi fyri skip, sum sigla í fastari rutu millum havnir í ES samveldinum. Aðrar handilsreglur gera seg eisini galdandi í tí sambandi, men tær verður ikki nortið við her.

Er eitt skip í fastari sigling millum ES havnir, kann ES gjøgnum havnastatin nokta skipinum at vera í fastari rutusigling millum ES havnir. Hinvegin eru regionalar reglur ikki galdandi fyri skip, sum eru í altjóða sigling, og bert av og á sigla inn í ES havnir, sum partur av altjóða virkseminum. Tað verður regulerað í altjóða handilssáttmálum. Skipaeftirlitið setur eins og onnur skipaeftirlit heldur ikki krav um, at regionalar reglur skulu lúkast í eitt nú ES. Tað er reiðarans skylda at finna framm til, hvørjar lokalar ella regionalar reglur eru galdandi í økinum, skip hansara sigla í.

Heimildin at gera havnastatseftirlit liggur í SOLAS, kap I reglu 19, verður sagt, at havnastatir eiga at hava eftirlit við skipum, sum sigla inn í teirra havnir. Hvussu hetta skal gerast er niðurfelt í Assembly resolutón A.787 (19) sum broytt við resolutión A.882 (21). Tað verður eisini staðfest í resolutiónini, at PSC ikki skal órógva rakstur og skipsarbeiðið meira enn hægst neyðugt. Talan er sostatt um eina altjóða heimild.

ParisMOU ásetur, at flaggstatir skulu flokkast á hvítan, gráan ella svartan lista, alt eftir hvussu nógv skip verða afturhildin, í mun til talið eftirlitum av skipum hjá tí flaggstatinum, sum verða gjørd. Hvíti listin umfatar flaggstatir, har skipini eru í somikið góðum standi, at ongi, ella bert fá av teimum verða afturhildin. Harumframt eru tey ikki „target“ hjá havnastatum, sum vil siga, at færri eftirlit verða gjørd á skipum, sum sigla undir einum flaggi, sum liggur á hvíta lista. Fløggini sum liggja á gráa lista hava ein flota, har skipini eru í rímiligum, men ikki nóg góðum standi til, at tey kunnu flokkast millum tey bestu og verða tí mál fyri eftirliti. Fløggini, sum flokkaði eru á svarta lista, hava skip í sínum skrásetingum, sum verða mett at verða



*Skip, sum eru í ringum standi kunnu elva stóran skaða, sum hendan myndin er dømi um.*

somikið stór hóttan móti heilsu trygd og umhvørvi á sjónum, at tey áhaldanadi eru mál fyri eftirliti. ParisMOU ásetur, at í minsta lagi 25 % av skipum undir fremmandum flaggi, sum vitja havnastatin, skulu kannast.

Flokkingin fer fram í samsvari við útrokningar, sum geva ein sonevndan „target factor" fyri hvønn einstakan flaggstat. Tá target factor er negativur, liggur flaggið á hvíta lista, er hann 0, liggur flaggið á markinum millum hvíta og gráa lista. Er target factor hægri enn 1, er flaggið á svarta lista. Fløggin, sum liggja á svarta lista, verða víðari flokkað sum „medium Risk, „Medium to High Risk", „High Risk" og „Very High Risk", alt eftir hvussu høgur target factor er. Target Factor verður ásetttur í árligu frágreiðingini frá ParisMOU.

Hjá Føroyum er target factor fyri 2008 0,25. Føroyar lógu á svarta lista til í 2001. Síðani tá hevur føroyska flaggið støðugt flutt seg uppeftir á gráa lista. Í løtuni eru treytirnar fyri at koma á hvíta lista, at í mesta lagi trý skip undir føroyskum flaggi skulu vera afturhildin seinastu trý árini. Demokratiska Fólkalýðveldið Korea liggur á botni á svarta lista við einum target factor sum er 7,89.

ParisMOU hevur avgjørt, at framyvir vera málini fyri eftirliti skip, sum hava nógv frávik, ella eru afturhildin og skip hjá reiðaríum, har vísast kann á frávik. Liggur flaggstaturin hjá skipinum ikki á hvíta lista, verður skip hjá flaggstatinum tó verða ein størri hóttan móti trygd og vandi er fyri, at ávísir flaggstatir ikki sleppa at sigla til havnastatir, sum nokta hetta, tí at flaggið ikki er flokkað á hvíta lista.

Paris Memorandum of Understanding on Port State Control ella ParisMOU, sum tað í dagligari talu verður nevnt byggir á eina fyrsitingarliga avtalu, sum i 1978 varð undirskrivað av nøkrum vestureuropeiskum sjóvinnumyndugleikum. Seinni kom Canada við og ParisMOU umfatar í dag 27 sjóvinnufyrsitingar. Í Føroyum er sjóvinnumyndugleikin Skipaeftirlitið.

Beint sum ParisMOU skuldi setast í verk í 1978, fór stóra liberiskt skrásetta tangaskipið Amoco Cadiz á land og varð vrak á Bretagne strondini í Fraklandi. Dálkingin frá teimum 220.000 tonsunum av olju, sum Amoco Cadiz hevði umborð, gjørdist sera umfatandi og verður av mogum metta sum størsta umhvørvisvanlukka nakrantíð. Vanlukkan viðførdi ógvisligt fólksligt og politiskt trýst í Europa um at fáa herdar reglur um trygd á sjónum. Trýstið elvdi til eitt nógv meira umfatandi memorandum, sum umfataði:

- Trygd á sjónum
- Fyribyrging av dálking á sjónum
- Livi og arbeiðsumstøður umborð á skipum.

ParisMOU varð endaliga samtykt og sett í verk hin 1. juli 1982. ParisMOU verður javnan dagført, alt eftir í hvønn mun altjóða reglur um trygd heilsu og umhvørvi verða dagførdar í IMO og ILO, umframt regionalu ES reglurnar. ParisMOU er einans galdandi fyri handilsskip. Fiskiskip eru ikki umfataði.

Skipaeftirlitið hevur ikki undirskrivað ParisMOU. Skal tað gerast, skulu Føroyar fyrst vinna seg upp á hvíta lista, fyri síðani at vera atlimir í nærri ásett royndartíðarskeið.

Tað finnast 8 slík memorandum havnastatseftirlit ymsastaðni í heiminum. Tey sum vera roknaði at vera sambærilig við ParisMOU eru TokyoMOU og US Qualship 21. Endamálið við samtøkunum um Port State Control er at eliminera „substandard skiparakstur". Í kjalarvørrinum av Port State Control kom hugtakið „Quality Shipping". „Quality Shipping" merkir í stuttum samsvar við krøvini.

---

1. Paris Memorandum of Understanding on Port State Control www.ParisMou.org
2. www.parismou.org/ParisMOU/Inspection+Database/Basic+Search/default.aspx
3. Sigling uttanfyri føroyska búskaparliga økið (200 fjórðinga markið)
4. www.parismou.org/upload/anrep/PSC_annual_report_20071.pdf
5. International Maritime Organsiaton, sjóferðslu felagsskapurin hjá ST www.imo.org
6. International Labour Organisation, Altjóða arbeiðarafelagsskapurin www.ilo.org

*Logo hjá Paris-MOU*

# Kanning av viðurskiftum

Í vár heitti Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið á Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning um at gera eina lýsing av ymiskum viðurskiftum hjá einum parti av føroyska arbeiðsmarknaðinum – hjá sjófólki, sum sigla í øðrum londum.

Tað eru Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, og Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, sum hava staðið fyri kanningini.

Kanningarúrslitið varð almannakunngjørt á tíðindafundi 1. desember 2009.

Til framløguna varð bóklingur prentaður, tilsamans 46 síður. Vit hava valt at endurgeva høvuðspartarnar í MIÐ & MAGN.

## Føroysk sjófólk í øðrum londum í 2008

Her verður givin ein lýsing av, í hvørjum londum og undir hvørjum skipanum føroysk sjófólk starvast, og hvussu mynstrið er broytt seinastu árini. Víst verður á, at føroysk sjófólk í høvuðsheitum starva undir donsku DIS-skipanini. Í øðrum lagi starvast nógv undir norsku NIS-skipanini meðan onnur sigla við skipum undir Grønlandi og Kanada.

Harumframt verður staðfest, út frá hagtølum úr DIS-skipanini, at flestu teirra starvast sum yvirmenn, meðan einans ein minni partur starvast sum dekkarar o.a.

Lýsingin av føroyskum sjófólkum í øðrum londum er grundað á tøl hjá TAKS. Tølini skulu takast við tí fyrivarni, at talan er um árstøl út frá skattaskipanini, t.v.s. at øll sjófólk eru tald við, óansæð um tey einans hava siglt ein part av árinum við útlendskum skipum. Tað hevði uttan iva verið rættari at havt hagtøl yvir fulltíðarstørv ella annað líknandi, men hesi eru tíverri ikki tøk.

## 961 sjófólk skrásett

Tilsamans vóru 961 sjófólk skrásett í øðrum londum í 2008. Harav vóru 512 undir DISskipanini, 299 undir NIS-skipanini og 150 í Grønlandi og Kanada. Her eigur at vera viðmerkt, at tølini fyri DIS og NIS eru rættiliga álítandi, meðan tølini fyri Grønland og Kanada eru leysligar metingar út frá TAKS-skipanini. Tað finnast ikki



# – hjá sjófólki, sum sigla í øðrum londum







skrásetingar av føroyskum sjófólkum undir øðrum skipanum enn DIS og NIS og annars í øðrum londum enn Grønlandi og Kanada.

Meiri enn helmingurin av føroyskum sjófólkum í øðrum londum starvast sambært hagtølunum undir DIS-skipanini, meðan næststørsti parturin er undir norskum skipanum.

Minsti parturin er undir Grønlandi ella Kanada.

## Føroysk sjófólk í øðrum londum, 1998-2008

Talið av føroyskum sjófólkum í øðrum londum hevur verið nøkulunda støðugt um 700 tey seinastu nógvu árini. Í 2006, 2007 og 2008 er talið tó hækkað til næstan 1.000. Mynstrið millum londini er eisini broytt nakað. Í 2001 vóru umleið tveir triðingar av føroysku sjófólkunum undir DIS-skipanini, 20 prosent undir Grønlandi og Kanada og 16 prosent undir NIS-skipanini. Í 2008 er býtið øðrvísi við tað, at lutfalsliga færri eru undir DIS, meðan fleiri eru undir NIS. Sum heild hevur býtið tó verið nøkulunda støðugt. Flest sjófólk hava verið undir DIS, og restin hevur býtt seg nøkulunda javnt millum NIS og Grønland og Kanada.

Fyri at fáa eina betri mynd av gongdini seinastu árini innan DIS, NIS og Grønland og Kanada, verður hugt eitt sindur nærri eftir einstøku bólkunum.

## Føroysk sjófólk í DIS

Umframt at fevna um Dansk Internationalt Skibsregister (DIS) fevnir uppgerðin eisini um Danmarks Almindelige Skibsregister (DAS). Nógv tey flestu sjófólkini eru undir DISskipanini – einans lítil partur er undir DAS. Í restini av frágreiðingini verður ikki skilt millum DIS og DAS, men alt verður kallað DIS.

*Hvat er rætta talið av DIS-sjófólkum. Ein samanbering av hagtølum frá TAKS og frá Søfartsstyrelsen:*

*30. september 2008 vórðu 319 føroysk sjófólk mynstraði undir DIS-skipanini sambært hagtølum frá Søfartsstyrelsen. Roknast má við, at nøkur sjófólk til eina og hvørja tíð eru avmynstraði vegna sjúku, frítíð ella annað, og tí framhaldandi mugu roknast fyri at hava sítt høvuðsstarv innan sjóvinnu. Harvið má roknast við, at talið 319 hjá Søfartsstyrelsen er nakað lægri enn veruliga talið í 2008.*

*Talið hjá TAKS fyri alt árið 2008 var 512. Øll sjófólk eru tald við í tølunum frá TAKS, óansæð um tey einans hava siglt ein part av árinum við útlendskum skipum. Roknast má tí við, at veruliga talið nokk er nakað lægri enn 512 í 2007.*

*Samanumtikið kundi ein meting verið, at talið í 2008 liggur um 450-500 fulltíðarstørv innan DISskipanina.*

Út frá samanberingini av tølunum frá Søfartsstyrelsen og TAKS sæst, at tølini hjá TAKS mugu metast sum rættiliga rættvísandi við tað, at TAKS-talið má metast sum størst møguliga talið, samstundis sum rætta talið av fulltíðarstørvum neyvan er meiri enn 10 prosent lægri enn TAKS-talið. Gongdin í TAKS-tølunum má tí metast at geva eina góða ábending av gongdini í samlaða talinum av føroyskum sjófólkum undir DIS-skipanini.

Út frá TAKS-tølunum fæst ein mynd av gongdini frá 1997 til 2008. Talan er um eina javna gongd, har talið hevur ligið millum sløk 400 til góð 450 øll árini.

Einasta undantakið hevur verið, at í 2008 vaks talið upp á 512. Talið vaks fyrst úr 388 í 1998 til 475 í 2001. Síðan fall tað niður í 379 í 2004 fyri síðan at vaksa til 446 í 2007 og 512 í 2008.

## Føroysk sjófólk í NIS

Uppgerðin yvir NIS fevnir um føroysk sjófólk undir norsku altjóða skipaskránni, NIS, og um sjófólk við farmaskipum og í oljuvinnuni. Hagtølini eru fingin til vega úr TAKS-skránni.

Upplýst er frá TAKS, at nógv tann størsti parturin eru fólk í oljuvinnuni.

Meðan „DIS'arnir" vaksa í tali fram til 2001 fyri síðan at falla, er gongdin beint øvugt fyri „NIS'-arnar". Møguliga er talan um eina ávísa flyting millum bólkarnar, soleiðis at sjófólk eru flutt úr NIS inn í DIS fram til 2001, fyri síðan at flyta úr DIS inn í NIS frá 2001 til 2004.

Eftir 2004 er tó talan um vøkstur í báðum bólkum. Hetta var samstundis sum afturgongd var í føroyska búskapinum, fyrst og fremst tí at støðan í alivinnuni og rækjuvinnuni var ikki góð.

Møguliga fluttu fólk av somu orsøk til DIS og NIS fyri at arbeiða. Vøksturin í talinum av DIS'arum og NIS'arum frá 2004 til 2007 er nøkulunda tann sami, nevniliga umleið 75 í hvørjum bólki. Frá 2007 til 2008 er vøksturin eisini nøkulunda ájavnur, umleið 70 í hvørjum bólki. Av tí at NIS'-arnir eru færri í tali er lutfalsligi vøksturin tó nakað væl størri í hesum bólkinum.

## Føroysk sjófólk í Grønlandi og Kanada

Frá TAKS er upplýst, at talið av sjófólkum í Grønlandi liggur millum 50 og 100, og í Kanada liggur talið um 20. Av tí, at nøkur sjófólk av skattligum orsøkum lata seg skráseta við c/o adressu í Grønlandi og tí ikki koma undir TAKS-skipanina, er mett, at samlaða talið av føroyskum sjófólkum í Grønlandi og Kanada liggur um 150.

Roynd er gjørd at fáa hendur á

### FØROYSK SJÓFÓLK Í ØÐRUM LONDUM Í 2008




### FØROYSK SJÓFÓLK Í ØÐRUM LONDUM, 1998-2008




*Mynd 3. Føroysk sjófólk í øðrum londum, 1998-2008. Talið av sjólki hevur ligið um 700, men er í 2008 vaksið til næstan 1.000.*
*Kelda: TAKS og metingar.*

neyvari tali av føroyskum sjófólkum í Grønlandi og at lýsa gongdina seinastu árini, men tað hevur ikki eydnast at fáa neyvari tøl. Tó er samlaða talið av útlendskum sjófólkum í Grønlandi tøkt, og av tí at stórur partur av útlendskum sjófólkum í Grønlandi eru føroysk sjófólk, kann hetta geva eina ábending av gongdini.

## Skráseting

Skrásetingin av útlendskum sjófólkum er gjørd út frá, hvar ein er føddur, t.v.s. talið av persónum í bólkinum „fiskere" og „født udenfor Grønland". Í tíðarskeiðinum 1996 til 2006 hevur talið ligið millum 200 og 300. Flestu árini hevur talið ligið um 200, meðan árini 2001, 2002 og 2003 lá talið um 300.

Metingin hjá TAKS á millum 50 og 100 tykist tískil at vera nøkulunda eftirfarandi. Talið er í øllum førum ikki nógv størri enn 100, við tað at samlaða talið av útlendskum sjófólkum í grønlendska flotanum liggur um 200.

## Føroyingar sigla sum yvirmenn

Út frá uppgerð hjá Søfartsstyrelsen ber til at fáa eina mynd av, hvørji størv føroysku sjófólkini hava umborð á skipum undir DIS-skipanini, og harvið eina rættiliga góða ábending av størvunum umborð á útlendskum skipum.

Yvirlitið er frá 30. september 2008 og er tað hugsandi, at føroysk sjófólk í øðrum londum hava á leið sama starvsbýti. Ilt er tó at siga, um mynstrið er broytt seinastu árini, ella um sama mynstrið eisini var galdandi fyri t.d. 10 árum síðani.

Føroysk sjófólk sigla í høvuðsheitum sum skiparar, navigatørar og maskinmeistarar. 81 prosent av øllum føroyskum sjófólkum undir DIS-skipanini sigla sum yvirmenn. Næststørsti bólkurin er dekkarar og maskinmenn, sum er umleið sjey prosent av føroyskum sjófólkum undir DIS-skipanini. Restin, t.v.s. 12 prosent, hava onnur størv. Mynstrið er sostatt rættiliga greitt, við tað at nógv tann størsti parturin av føroysku sjófólkunum umborð á útlendskum skipum sigla sum yvirmenn.

Ein spurningur kundi verið, um sama mynstrið er galdandi fyri aðrar tjóðir undir DIS-skipanini.

### DIS, DANSK INTERNATIONALT SKIBSREGISTER




*Mynd 4. Talið av føroyskum sjófólkum, sum sigla undir DIS, hevur ligið nøkulunda støðugt um 400 til 450. Í 2008 er talið komið upp á 512. Kelda: TAKS.*

### NIS, NORSK INTERNASJONALT SKIPSREGISTER, FARMASKIP OG OLJUVINNA




*Mynd 5. Talið av føroyskum sjófólki, sum sigla undir NIS, er vaksið mundandi síðan 2001. Kelda: TAKS.*

### ÚTLENDSK SJÓFÓLK Í GRØNLANDI




*Mynd 6. Stórur partur av útlendskum sjófólki í Grønlandi eru føroyingar. Kelda: Grønlands Statistik.*

Umleið helmingurin av dønum sigla sum yvirmenn undir DIS-skipanini, meðan minni parturin av filipinum, indarum og pólendingum sigla sum yvirmenn. Føroyska mynstrið er sostatt rættiliga serstakt, við tað at lutfalsliga nógv størri partur av føroysku sjófólkunum sigla sum yvirmenn.

## Inntøkan hjá føroyskum sjófólkum

Hóast hagtalsgrundarlagið ikki er av tí besta, er gjørligt at fáa eina rættiliga góða hóming av bæði miðalinntøkuni og samlaðu inntøkuni hjá sjófólki okkara í øðrum londum.

Miðalinntøkan hevur verið støðugt vaksandi og serliga er tað inntøkan undir norsku NISskipanini, sum er vaksin rættiliga fitt frá 1998 til 2008. Eitt gott boð upp á eina miðalinntøku í 2008 liggur um kr. 400.000. Samlaða inntøkan er eisini vaksin, serliga eftir 2004. Samlaða inntøkan lá í 2007 um 260 mió. kr. Um hædd hevði verið tikin fyri, at DIS-skipanin er ein nettoskattaskipan, hevði samlaða inntøkan verið nakað hægri enn 260 mió. kr.

## Miðalinntøkan hjá sjómonnum í øðrum londum

Út frá hagtølum frá TAKS og Grønlands Statistik er møguligt at fáa eina hóming av miðalinntøkuni hjá føroyskum sjófólki undir DIS, NIS og Grønlandi. Tað er ikki gjørligt beinleiðis at samanbera miðalinntøkurnar, m.a. tí at grønlendsku hagtølini eru umroknað til fulltíðarstørv og harvið ikki eru sambærlig við TAKS-tølini, ið, sum áður nevnt, hava allar inntøkur við, hóast hesar einans eru vunnar part av árinum. Ein onnur orsøk er, at inntøkurnar undir DIS-skipanini eru 'netto-inntøkur', t.v.s. reiðaríið hevur afturhildið tann partin, sum annars hevði farið til skattingar. Harafturímóti er NIS-skipanin eins og grønlendska skipanin ein brutto-skipan, t.v.s. at inntøkurnar eru áðrenn skatt.

## Hagtølini

Hóast stóru trupulleikarnir í hagtølunum ber til at fáa eina hóming av inntøkunum hjá føroyskum sjófólki í fremmandum londum. Verður DIS-inntøkan, sum liggur um kr. 300.000

### FØROYSK SJÓFÓLK Í DIS-SKIPANINI




### TALVA 1

| | Navigatørar og maskinmeistarir | Dekkarir og maskinfólk | Onnur í tænastu | Ikki í tænastu | Onnur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Danmark | 2.804 | 1.424 | 891 | 74 | 472 | **5.665** |
| Philippinerne | 413 | 1.271 | 680 | 36 | 109 | **2.509** |
| India | 274 | 362 | 110 | 22 | 21 | **789** |
| Póland | 136 | 275 | 187 | 7 | 6 | **611** |
| Føroyar | 261 | 21 | 12 | 5 | 20 | **319** |
| Thailand | 0 | 1 | 201 | 1 | 0 | **203** |
| Ukraina | 115 | 64 | 12 | 0 | 10 | **201** |
| Letland | 56 | 54 | 36 | 0 | 3 | **149** |
| Svøríki | 22 | 19 | 80 | 7 | 1 | **129** |
| Russland | 65 | 33 | 10 | 3 | 3 | **114** |
| | | | | | | |
| Tilsamans | **4.146** | **3.524** | **2.219** | **155** | **645** | **10.689** |

*Munandi fleiri føroyingar undir DIS-skipanini sigla sum yvirmenn sammett við aðrar tjóðir. Kelda: Hagtøl úr DIS-skipanini pr. 30. september 2008.*

### MIÐALINNTØKA HJÁ SJÓFÓLKI UNDIR NIS OG DIS OG UNDIR GRØNLANDI




*Mynd 8. Miðalinntøkan hjá sjófólki undir NIS og DIS og undir Grønlandi. Kelda: Hagtøl úr TAKS, Grønlands Statistik og metingar.*

## SAMLAÐA INNTØKAN HJÁ SJÓFÓLKI Í ØÐRUM LONDUM




*Mynd 9. Samlaða inntøkan hjá føroyskum sjófólki í øðrum londum. Kelda: TAKS*

## ÁRIN Á BÚSKAPIN – AVLEITT VIRKSEMI




*Mynd 10. Nýtslan av uttanlandssjóinntøkuni er við til at skapa virksemi í føroyska samfelagnum. Hetta virksemið er roknað til uml. 67 mió. kr. í 2008. Kelda: TAKS og egnar útrokningar.*

## ÁRIN Á BÚSKAPIN – ÍROKNAÐ ALMENT VIRKSEMI




*Mynd 11. Uttanlandssjóinntøkurnar og avleidda virksemið er við til at fíggja alment virksemi. Hetta er roknað til góðar 200 mió. kr. í 2008. Kelda: TAKS og egnar útrokningar.*

netto í 2008, umroknað til bruttoinntøku vil hon liggja nakað omanfyri kr. 400.000. Hetta er nakað sama støðið, sum miðalinntøkurnar undir Grønlandi og undir NIS-skipanini.

Við øllum neyðugum fyrivarni fyri ymiskum uppgerðarhættum og skattaskipanum er tað nógv, sum bendir á, at kr. 400.000 er eitt gott boð upp á eina miðal ársinntøku fyri skatt hjá føroyskum sjófólki í øðrum londum í 2008.

### Samlaða inntøkan hjá føroyskum sjófólki í øðrum londum

Ein uppgerð av samlaðu inntøkuni hevur stórt sæð somu fyrivarni sum omanfyri, nevniliga at DIS-skipanin er ein netto-skattaskipan og vísur inntøkuna „eftir skatt", meðan grønlendsku inntøkurnar og inntøkurnar undir NIS-skipanini eru bruttoskattaskipanir og vísa inntøkuna fyri skatt. Tað er tí ikki gjørligt beinleiðis at samanbera hesar inntøkurnar.

Frá 2004 vaks inntøkan rættiliga skjótt upp í 320 mió. kr. í 2008, t.v.s. við umleið 35 mió. kr. um árið. Her skal havast í huga, at hevði DIS-inntøkan verið roknað um til eina brutto-inntøku, høvdu tølini verið nakað størri.

Vøksturin frá 2004 til 2008 stavar frá øllum trimum inntøkubólkum. Serliga stórur er vøksturin í NIS-inntøkunum, sum eru tvífaldaðar frá 2004 til 2008.

### Inntøkan skapar umfar í føroyska búskapinum

Hóast uttanlandsinntøkurnar ikki verða beinleiðis skattaðar í Føroyum, eru tær við til at skapa virksemi og inntøkur í føroyska samfelagnum, tí peningurin verður vanliga nýttur í Føroyum.

Uttanlandsinntøkurnar eru herviðvið til at skapa byggivirksemi, eftirspurning eftir tænastum, bilakeyp, umframt vanligt keyp av nýtsluvørum. Umframt at nýtslan av peninginum verður skattað gjøgnum MVG'ið, skrásetingargjøld o.a. eru uttanlandsinntøkurnar eisini við til at skapa lønarkrónur í øðrum vinnum, og eru tær harvið eisini við til at geva landinum og kommunum skattainntøkur.

Skatta- og avgjaldsinntøkurnar frá uttanlandsinntøkunum verða nýttar

til almennar lønir, løgur og nýtslu, og eru á henda hátt aftur við til at skapa virksemi í samfelagnum.

Samlaða árinið av uttanlandsinntøkunum er tí størri, enn vit vanliga geva okkum far um. Eitt gott boð uppá árinið er, at uttanlandsinntøkurnar eru við til at skapa umleið eins stórt virksemi í føroyska samfelagnum sum tær upprunaliga sjálvar eru. Tað vil siga, at t.d. í 2008, tá uttanlandsinntøkurnar vóru umleið 320 mió. kr., hava tær í sama árið skapt virksemi fyri umleið 320 mió. kr. í føroyska samfelagnum – antin beinleiðis gjøgnum vørukeyp ella óbeinleiðis gjøgnum ringárinini og almennu nýtsluna, sum er beinleiðis og óbeinleiðis fíggjað av uttanlandsinntøkunum.

## Vøru- og tænastukeyp skapa ringárin

Gjøgnum íløgur og keyp skapar uttanlandssjóinntøkan eitt virksemi í búskapinum. Hetta virksemið er roknað til at hava ein lønarumsetning á umleið 67 mió. kr. í 2008. Sjálvur umsetningurin av íløgunum og vøru- og tænastukeypinum er nakað væl størri, men her er einans lønarparturin nevndur, tí hesin gevur eina góða ábending av støddini av virkseminum.

Ein lønarpartur á 67 mió. kr. skal síggjast í mun til, at samlaða uttanlandssjóinntøkan í 2007 er umleið 260 mió. kr., og harav eru út við 60 mió. kr. goldnar í skatti í útlandinum og í Føroyum.

## Grundarlag undir almennum virksemi

Uttanlandssjóinntøkurnar og avleidda virksemið skapa gjøgnum skatt og avgjøld inntøkur til almennu kassarnar hjá landi og kommunum og eru harvið við til at fíggja almenna virksemið.

Almenna virksemið er lutvíst beinleiðis við til at fíggja seg sjálvt, við tað at alment sett eisini gjalda skattir og avgjøld, og lutvíst óbeinleiðis, við tað at almenna virksemið eisini skapar ringárin á búskapin.

Við at nýta vanliga lutfalsliga býtið av almennu útreiðslunum er gjørligt at finna fram til, hvussu stórur lønarparturin av almennu útreiðslunum er, og hvørja ávirkan hesar hava á búskapin. Samlaðu almennu lønarútreiðslurnar, sum eru beinleiðis og óbeinleiðis fíggjaðar av uttanlandsinntøkunum eru roknaðar til góðar 200 mió. kr. í 2008. Saman við upprunaligu uttanlandsjóinntøkunum og avleidda virkseminum eru hetta við til at lyfta samlaðu lønarútreiðslurnar upp á knappar 600 mió. kr.

### ÁRIN Á BÚSKAPIN – SAMLAÐ ÁRIN




*Mynd 12. Samlaða búskaparliga árinið av uttanlandssjóinntøkunum er umleið tvífalt so stórt sum upprunaliga uttanlandssjóinntøkan. T.v.s. frá at vera ein inntøka á 320 mió. kr. eru lønirnar gjøgnum avleitt virksemi og alment virksemi økt til út við 620 mió. kr. í 2008. Kelda: TAKS og egnar útrokningar.*

### SKATTA- OG AVGJALDSINNTØKUR AV UTTANLANDSINNTØKUM




*Mynd 13. Hóast beinleiðis skatturin av uttanlandsinntøkuni er sera avmarkaður, kemur rættiliga fitt inn í almennu kassarnar gjøgnum avgjøld og avleitt virksemi. Tilsamans var talan um 242 mió. kr. í 2008. Kelda: Egnar útrokningar.*

## Samlaða árinið á búskapin

Samlaða árinið á búskapin er árinið frá:

- Uttanlandssjóinntøkunum hjá sjófólki undir DIS, NIS, Grønlandi og Kanada
- Avleitt virksemi av vøru- og tænastukeypi frá uttanlandsinntøkunum
- Alment virksemi fíggjað av uttanlandsinntøkunum og harav avleiddum virksemi
- Avleitt virksemi av almennum vøru- og tænastukeypi

Støddin av avleidda virkseminum og almenna virkseminum er greitt frá omanfyri. Eftir er tó avleidda privata virksemið, sum er avleitt av almenna virkseminum. Hetta er roknað til at vera um 30 mió. kr. í lønarútreiðslum í 2008.

Samlaða árinið er harvið nakað væl

## STØRV Í DIS OG LUTFALL AV DØNUM Í DIS-SKIPANINI




*Mynd 14. Tal av dønum í DIS skipanini og samlaða talið í DIS. Kelda: DIS-skipanin.*

## NAVIGATØRAR OG MASKINMEISTARAR Í DIS




*Mynd 15. Tal av donskum yvirmonnum í DIS skipanini og samlaða talið av yvirmonnum í DIS. Kelda: DIS-skipanin*

størri enn upprunaliga uttanlandssjóinntøkan. Oman á uttanlandssjóinntøkuna á 320 mió. kr. skulu leggjast alment virksemi á 200 mió. kr. og avleitt virksemi á umleið 67 og 30 mió. kr. Tilsamans gevur hetta næstan 620 mió. kr. – t.v.s. útvið tvífalt upprunaligu inntøkuna á 320 mió. kr.

Harvið sæst, at hóast uttanlandsinntøkan verður skattað í útlandinum, er hon við til at skapa munandi virksemi í føroyska búskapinum, nevniliga umleið eins stórt virksemi sum sjálv óskattaða uttanlandssjóinntøkan.

### Inntøkur fyri land og kommunur

Uttanlandssjóinntøkan er, sum nevnt, við til at skapa inntøkur í almennu kassarnar í Føroyum.

Inntøkurnar stava frá øllum liðum á áðurnevndu ketu, nevniliga frá sjálvari uttanlandsinntøkuni, frá avleiddum virksemi og frá almennum virksemi.

Beinleiðis skattainntøkan frá uttanlandssjóinntøkunum var rættiliga avmarkað, 8,5 mió. kr. í 2008. Harafturímóti var inntøkan frá avgjøldum omanfyri 68 mió. kr. Góðar 37 mió. kr. komu inn í skatti og avgjøldum frá avleiddum virksemi frá uttanlandsinntøkunum. Umleið 111 mió. kr. stavaðu frá inntøkum av almenna virkseminum og 17 mió. kr. frá avleiddum virksemi av almenna virkseminum.

Samanlagt var talan um 242 mió. kr. í almennum inntøkum, sum beinleiðis ella óbeinleiðis stavaðu frá uttanlandssjóinntøkunum.

Til samanberingar kann nevnast, at samlaða inntøkan hjá landi og kommunum í 2008 lá um 5,5 mia. kr. Tað vil siga at roknast má við at millum 4 og 5 prosent av samlaðu inntøkunum hjá almennu kassunum í 2008 beinleiðis og óbeinleiðis stavaðu frá uttanlandsjóinntøkunum. Skatta- og avgjaldsinntøkur av uttanlandsinntøkum

### Gongdin undir DIS-skipanini

Tað er líkt til, at talið av sjómonnum undir Grønlandi og Kanada er nøkulunda støðugt. Ein áhugaverdur spurningur kann vera at hyggja at, um vaksandi talið av føroyskum sjófólkum undir DIS- og NIS-skipanunum er nakað, sum fer at halda fram ella ikki.

Tað hevur ikki verið gjørligt at funnið tøl fyri NIS-skipanina, men áhugaverd tøl eru at finna fyri donsku DIS-skipanina.

Talið av størvum undir DIS-skipanini er økt úr umleið 2.000 til umleið 10.000 frá 1988 til 2008. Í sama tíðarskeiði er lutfallið av donskum størvum í skipanini fallið úr umleið 85 prosentum niður í 45 prosent. Tað kann tí tykjast, sum um danir verða trokaðir burtur úr skipanini av bíligari útlendskari arbeiðsmegi.

Her skal havast í huga, at føroyingar verða skrásettir sum danskarar í skipanini – t.v.s. tað kann eisini tykjast, sum um at føroyingar verða trokaðir burtur úr skipanini. Hetta er tó ikki í samsvar við mynstrið, vit sóu omanfyri, har talið av føroyskum sjófólkum undir DISskipanini var vaksandi. Orsøkin til ósamsvarið er, at hóast tað eru lutfalsliga færri danskarar (og føroyingar) í DIS-skipanini, so er talið framvegis vaksandi. Talið av útlendskum sjófólkum undir DIS-skipanini økist tó meiri enn talið av føroyskum og donskum sjófólkum.

Harvið minkar lutfallið millum donsk og útlendsk sjófólk í skipanini.

Verður hugt eftir yvirmonnum undir DIS-skipanini, sum er mest áhugavert fyri føroysk sjófólk, er mynstrið nakað tað sama, men ikki heilt so markant. Talið av sjófólkum í skipanini er vaksið úr sløkum 600 til sløk 4.000 í tíðarskeiðinum 1988 til 2008, meðan lutfallið av føroyskum og donskum yvirmonnum er fallið úr 95 niður í umleið 65 prosent.

# Sporføri loysir praktiskan trupul



*Jóhannus Olsen*

## Føroya Sporførisskipan er komin í eina avgerandi fasu. Neyðugt er at hava góðkennandi almennu myndugleikarnar við, um skipanin skal virka

– Hví skulu tit uppfinna eina nýggja loysn, tá skipanin longu finst?

Formaðurin í Ráfiskarakeyparafelagnum og Felagnum Línuskip, Jóhannus Olsen, kundi ikki bara sær, tá kunnandi fundur varð hildin á Hotel Hafnia fyri jól um nýggju váttanarkrøvini, sum á nýggjárinum vórðu sett øllum fiski, ið verður innfluttur til Evropeiska Samveldið.

Á fundinum hevði Fiskiveiðieftirlitið fingið ein edv-serkønan at greiða frá, hvussu skipanin, ið krevur rættiliga nógva skjalaumsiting, kundi verið skipað á einum talgildum portali. Jóhannus Olsen fekk ongantíð svar upp á spurningin. Fundarluttakararnir vistu allir, hvat hann sipaði til, og kjakið varð brotið av, tí tað ikki var hildið at hoyra heima á júst tí fundinum.

Jóhannus Olsen er nevniliga eisini formaður í partafelagnum Føroya Sporførisskipan, sum í skjótt seks ár hevur arbeitt við eini verkætlan, har allar hugsandi skrásetingar viðvíkjandi veiðu, tilvirkan og flutningi, fylgja vøruni heilt frá skipi til endabrúkara.

### Spara pappírsarbeiði

Sporføri – tað at endabrúkarin við einum unikkum nummari skal kunna fylgja vøruni og síggja nágreiniliga, hvar hon er fiskað, hvar og hvussu hon er virkað og, hvussu hon er flutt – hevur frá byrjan verið málið við skipanini.

Men veruligi vinningurin við skipanini vísir seg vera, at allir partar í virkisgongdini verða spardir fyri umfatandi pappírsarbeiði, og tí átti sporførisskipanin at verið skraddaraseymað til krøvini, sum nú verða sett av ES fyri at forða fyri at ólógliga veiddur fiskur kemur inn á evropeiska marknaðin.

Tað halda fólkini aftan fyri p/f Føroya Sporførisskipan í hvussu so er.

Í tvey ár hevur skipanin verið so at siga búgvin at taka í brúk. Trupulleikin er, at góðkennandi myndugleikarnir ikki rættiliga hava viljað tikið skipanina til sín, og her verður serliga hugsað um Fiskiveiðieftirlitið undir Fiskimálaráðnum.

### Fiskimálaráðið stuðlar

Hetta kann tykjast heldur løgið, tí Fiskimálaráðið hevur annars stuðlað verkætlanini allan vegin ígjøgnum.

Tað var núverandi fiskimálaráðharrin, Jacob Vestergaard, sum í fyrra tíðarskeiði sínum sum fiskimálaráðharri var við til at seta gongd á sporførisskipanina við eini verkstovu, sum varð hildin í 2003.

Síðan hevur Fiskimálaráðið stuðla menningini av sporførisskipanini. Av fyrstan tíð sum granskingarstuðul gjøgnum skipanina, sum eitur Fiskivinnuroyndir, og seinni – tá partafelagið varð stovnað – við innskotspeningi, tó uttan at gerast partaeigari.

Partaeigararnir eru Ráfiskakeyparaog Ráfiskaseljarafeløgini, og formaður í nevndini er sum sagt Jóhannus M. Olsen, reiðari og formaður í Ráfiskaseljarafelagnum.

### Fáa gongd á

Síðani kunnandi fundin á Hafnia er ikki hent meira, enn tað annars er hent hesi seinastu tvey árini, har felagið nærum hevur ligið stilt.

– Vit skulu nú hava greiðu á, um tað verður til nakað ella ikki. Eg trúgvi fult og fast uppá, at vit hava ment eina góða skipan, sum fer at lætta ómetaliga nógv um hjá øllum pørtum. Eg trúgvi eisini, at júst nýggju ES-krøvini kunnu vera kveikjarin, sum kann fáa gongd á sporførisskipanina, sigur Jóhannus Olsen, og vísir á, at neyðugt er at fáa skipanina at koyra í fullum líki áðrenn nyttan og fyrimunirnir kunnu staðfestast endaliga.

Fyri nevndarformannin hevur tað einki at siga, hvør eigur skipanina, hvussu hon eitur og hvar hon verður plaserað fysiskt. Tí er hugsandi, at broytingar fara at henda í strukturinum viðvíkjandi sporførisskipanini í næstum.

Í øllum førum hevur síðan nýggjárið verið umfatandi fundarvirksemi millum ymsar partar í skipanini fyri at fáa sporførisskipanina upp at koyra.

### Vinningur fyri vinnuna

– Sjálvt sporførið er í veruleikanum ikki tann største vinningurin við skipanini. Skipanin er til so ómetaliga stóra hjálp fyri vinnuna, at tað vildi verið stór spell um hon nú datt niðurfyri, sigur Jóhannus Olsen, og grundgevur víðari:

– Tað er ein ørgrynna av skjølum, ið verða borðin, faksað, mailað og

leika

send aftur og fram í sambandi við veiðu, tilvirkan, flutning og sølu av fiski. Sporførisskipanin ger, at upplýsingarnir bert nýtast at verða inntastaðir eina ferð, og síðan fylgja fiskinum til hann er komin fram til brúkaran. Og vit spara eina rúgvu av umsiting og arbeiðstíð.

– Við núverandi framgangshátti brúka vit óneyðuga nógva tíð og orku upp á at tasta somu dátur umaftur og umfaftur, og harvið økist vandin allatíðina fyri, at tað verður skeift inntastað. Í síðsta enda ræður tað fyri vinnuna um at spara pening, vísir Jóhannus Olsen á.

### Útflutningur?

Tí er tað enn sum áður avgerðandi um Fiskiveiðieftirlitið vil vera við í skipanini.

– Fiskiveiðueftirlitið er góðkennandi myndugleikin í øllum sum hevur við útflutning av fiski at gera. Tí er neyðugt, at hesin myndugleiki er við, og tekur sporførisskipanina til sín sum eitt sentralt amboð í síni umsiting. Tá Fiskiveiðieftirlitið er komið við, fara allir aðrir partar at fylgja við, heldur Jóhannus Olsen.

– Sum eg dugi at síggja tað, er okkara skipan skraddaraseypað til tey nýggju krøvini, sum nú verða sett. Fara vit í gongd við at innføra sporførisskipanina vinna vit eitt fet í kappingini við okkara kappingarneytar. Tí vit vita, at øll onnur lond arbeiða við at fáa eina líknandi skipan upp at koyra. Vit hava skipanina klára, men hava bara ikki tikið hana í brúk enn.

Harvið vísir Jóhannus Olsen eisini á møguleikan at selja sporførisskipanina uttanlands.

– Sjálvandi liggur tað ein møguleiki í at selja skipanina uttanlands, men tað er als ikki ein spurningur, sum er aktuellur í løtuni. Vit vilja hava gongd á sporførisskipanina her heima, helst so skjótt sum møguligt, og so mugu vit bara arbeiða víðari harfrá, sigur Jóhannus Olsen.

## Nyttan av sporførinum

**Talan er ikki bara um eina sporførisskipan, men í størri mun um eina skipan, ið lættir um umsitingarliga arbeiði hjá øllum pørtum í fiskaframleiðsluni**



*Steinbjørn í Dali*

Veiðudagbók, døgnlisti, mynstringarlisti, vektarseðil, avreiðingarseðil, móttøkulisti, sølulisti, útflýggingarseðil, fylgiseðil, koyriseðil, fakturi, avskipingarlisti, útflutningsskjal, flutningsskjal, móttøkuváttan.

Skjølini eru mong, sum skulu útfyllast frá tí at fiskurin er fiskaður, til hann er frammi hjá tí, sum skal fáa mettuna av honum.

Á nýggjárinum kom enn eitt týdningarmikið skjal á langa listan: Veiðiváttan, Catch Certification, sum skal tryggja at fiskur, ið verður fluttur til ES-londini, ikki er ólógliga fiskaður.

Skipanin krevur fleiri skjøl, harav fleiri enn ikki hava fingið føroyskt navn: framleiðaraváttan, prior notification, pre-landing declaration, pre-transhipment declaration.

### 25 skrásetingar

Tá hugskotið til eina sporførisskipan varð kveikt fyri skjótt 10 árum síðani, kom hetta av, at onkur hevði talt upp, at hvør stertur varð skrásettur á eini 25 skjøl áðrenn fiskavøran var frammi í handlunum í Evropa.

– Tað er ein øgilig orka og arbeiðstíð, sum verður brúkt fyri at skráseta, kopiera, seta í ringbind, faksa, posta, endurskráseta, endurskráseta og aftur skráseta, staðfestir Steinbjørn í Dali, sum øll árini hevur staðið á odda fyri projektinum, seinastu árini sum stjóri í felagnum. Hetta starvið hevur tó ikki givið nakra samsýning í fleiri ár, orsaka av vantandi kapitali.

– Upprunaliga var okkara hugskot at hjálpa kundanum til at spora seg fram til, hvar fiskurin er hagreiddur og fiskaður gjøgnum eitt serligt nummar, sum vøran fær.

– Men verkætlanin vísti rættiliga skjótt ikki bara at vera ein sporførisskipan, men í nógv størri mun ein skipan, sum kann lætta um umsitingarliga arbeiðið hjá øllum teimum pørtunum, sum eru við í fiskaframleiðsluni. Um hesir partar vilja taka skipanina til sín, væl at merkja, sigur Steinbjørn í Dali.

### Fjøltáttað skipan

Talan er um eina umfatandi og fjøltáttaða skipan, men um tað skal sigast einfalt, er talan um at innlesa neyðugar upplýsingar, sum hoyra til vøruna, so tað bert nýtist at gerast eina ferð.

– Sporførisskipanin er gjørd soleiðis, at hon virkar uttan mun til hvørjar edv-skipanir, ið annars verða brúktar av teimum skipum, virkjum og myndugleikum, ið annars leggja upplýsingar afturat ella taka dátur og hagtøl burturúr, greiðir Steinbjørn í Dali frá.

Í løtuni eru tað nakrir brúkarar, sum lata skjøl inn og fáa skjøl úr sporførisskipanini. Tað eru m.a. fimm skip umframt Faroe Seafood, sum brúkar sporførisskipanina til síni útflutningspappír. TAKS er eisini knýtt at skipanini í sambandi við at útflutningspappírini hjá Faroe Seafood verða avgreidd.

# Hátíðarhald og próvhan





Maskinmeistarar: Fremst frá vinstru: Eyðfinn J. Mellemgaard, Paul Rouah, Mortan S. Thomsen, Jákup Martin á Válinum og Bjarki Hansen. Aftast frá vinstru: Magni Hansen, Gunnar F. Poulsen, Sjúrður Poulsen, Benny Bærentsen, Eirikur Lauritsen og Helgi F. Strømsten.



Skipsførarar:
Frá vinstru Bárður Laksáfoss
og Bergur Djurhuus.

# dan í Vinnuháskúlanum



*Skiparar. Jákup Elias Sjatlá, Dánjal Jákup Kristiansen, Poul Arni Jacobsen, Henry H. Clementsen, Petur S. Johannesen, Eyðstein T. Olsen og Gunnar Á. Højgaard. Aftast frá vinstru: Pauli Hammer, Óli Hammer, Jóhan P. Eyðsteinsson, Svein Eliasen, Hallur Kjærbæk, Bárður Sørensen, Torkil Joensen og Trygvi Thomsen.*

18. desember 2009 var hátíðarhald og próvhandan í Vinnuháskúlanum.

Í røðu síni segði Hans Johannes á Brúgv skúlastjóri m.a. Nú eru vit aftur á skúlanum at hátíðarhalda, at vit í dag hava fingið eitt lið av nýggjum maskinmeistarum og Navigatørum. Hesir eru 11 maskinmeistarar, 16 skiparar og 2 skipsførarar. Tilsamans 40 vóru innstillaðir til royndirnar, og 29 kláraðu tað.

Eftir mikið stríð og strev eru tit, at enda komin á mál, próvtøkan er lokin, og lívið liggur opið fyri framman. Tit hava nú gingið her í eina tíð, skiparar í 1½ ár, skipsførararnir og Maskinmeistararnir í 3 ár, onkur eitt sindur longur.

Vit vóna, at flestu skipararnir halda fram til skipsførara.

Vinnuháskúlin hevur ætlanir um at økja møguleikan fyri at fleiri føroyingar taka okkara útbúgvingar. Vit hava ætlanir um at gera avtalur við reiðarí, tað verður seg føroysk og útlendsk, har vit kunnu útvega nýggjum lesandi siglingartíð og lærupláss – sokallað aspirant-líknandi skipan. Tankin er, at tá ein søkir á Vinnuháskúlan, so skipað vit eisini fyri siglingartíðini og ikki sum í dag, har ein sjálvur má útvega hesa.

Síðani 1. januar 2009 hevur verið møguligt at lesa til skipsførara sum fjarlestur; hetta er enn á royndarstigi. 15 næmingar meldaðu seg til tann 1. januar 2009; staðfestast má, at tað krevur disiplin at lesa sum sjálvlesandi. Og okkara royndir higartil, nú eitt ár er farið, er at fleiri fella frá ávegis.

Umsøkjaratalið til Vinnuháskúlan fyrsta hálvár 2010 var høgt. 92 umsøkjarar vóru til tær 4 útbúgvingar, sum eru í skúlanum. Fyrra hálvár 2010 ganga um 250 fólk á Vinnuháskúlanum.

### Hesar virðislønir vóru latnar:

- Jack Joen-Jacobsen: Klokkusett frá Faroe Agency.
- Svein Eliasen: Klokkusett frá Faroe Agency.
- Petur Signar Johannesen: Ur frá Søfartens Ledere.
- Bjarki Hansen: Fototól frá Føroya Banka.
- Benny Bærentsen: Mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.
- Jákup Martin á Válinum: Gullur frá A. P. Møller.
- Bárður Laksáfoss: Gullur frá A.P. Møller.
- Bergur Djurhuus: Klokkusett frá Tryggingarfelagnum Føroyar.
- Jack Joen-Jacobsen: Barografur frá Skipara- & Navigatørfelagnum fyri hægsta próvtal.

# Góð tíðindi frá Reiðarafelagnum

Tað eru góð tíðindini hjá formanninum í Maskinmeistarafelagnum, Páll Hansen, at Reiðarafelagið sær týdningin í nýggjum framkomnum sáttmálum fyri fiskiskipini.

Páll Hansen sigur, at longu fyri trimum árum síðani boðaði Maskinmeistarafelagið Reiðarafelagnum frá, at felagið var sinnað at fara undir samráðingar, fyri at fáa nútímansgjørt sáttmálarnar.

Tað var eftir, at Viberg Sørensen, nývaldur formaður í Reiðarafelagnum, hevði tosað við feløgini um sáttmálarnar. Tað vóru tveir fundir, men so hendi einki meir, sigur Páll Hansen.

Maskinmeistarafelagið hevur drúgvar royndir tá talan er um fastlønarsáttmálar. Longu fyrst í 90unum vórðu fyrstu fastlønarsáttmálarnir gjørdir fyri føroyskar maskinmeistarar, sum sigla við grønlendskum rækjuskipum.

Tær samráðingarnar endaðu við, at býtisprosentið lækkaði eitt prosent, úr 28 niður í 27 prosent.

Nú fáa allir føroyskir maskinmeistarar við grønlendskum rækjuskipum fasta løn, umframt bonus. Hjá einum maskinstjóra liggur fasta lønin millum 45.000 og 50.000 kr., um mánaðin, umframt bonus.

Síðani hevur arbeiðið við at fáa fastlønarsáttmálar hildið fram, og flestu maskinmeistarar við føroysku uppsjóvarskipunum hava fastlønaravtalu, sum er gjørd við reiðaríið.

Fyrst í hesi øldini var fyrsta fastlønaravtalan gjørd fyri maskinmeistarar, sum sigla við føroysku partrolarunum, og í dag hava flest allir, sum sigla við partrolarum fastlønaravtalu. Hjá teimum liggur lønin millum 32 og 35.000 kr., um mánaðin, umframt bonus, sum verður útroknað einaferð um fjórðingsárið.

Í øllum førum hava avtalurnar virkað væl, og tí fegnist eg um, at eisini hini manningarfeløgini og Reiðarafelagið sær týdningin í nýggjum framkomnum sáttmálum. Hesar avtalu eiga at gerast sjónligar í sáttmálanum við Reiðarafelagið í framtíðini, sigur Páll Hansen.



*Páll Hansen, avmyndaður til prógvhandan á Vinnuháskúlanum, har hann fluttið fram røðu.*

## Føðingardagar hjá limum okkara

| | | |
|---|---|---|
| Knút Jóhannes Hansen | 2. januar 1960 | 50 ár |
| Meinhard Person Jacobsen | 8. januar 1960 | 50 ár |
| Sæmund Tausen | 11. januar 1960 | 50 ár |
| Bogi Jacobsen | 24. januar 1960 | 50 ár |
| Tórfinn Danielsen | 29. januar 1960 | 50 ár |
| Eyðun Samuelsen | 5. mars 1960 | 50 ár |
| Willy Jan Feilberg | 24. apríl 1960 | 50 ár |
| Jan Weihe | 21. januar 1970 | 40 ár |
| Leif Mohr | 21. januar 1970 | 40 ár |
| Grímur Vang | 17. mars 1970 | 40 ár |
| Steinbjørn Zachariassen | 28. apríl 1970 | 40 ár |

# Brot úr dagbókini hjá Maskinmeistarafelagnum

**5. oktober:**
**Oslo; hálvárligur NMF fundur**
10 mál á skránni m. a. landaraportir. Útflaggan av Tårntank Rederi til DIS og Furetank til FAS.
Næsti fundur verður í Føroyum 14. apríl 2010.

**8. oktober: HAK**
Fundur um samanskriving av sáttmálum við Fíggjarmálaráðið.
Endamál at fáa allar sáttmálarnar at líkjast meira.

**23. oktober: MF Nevndarfundur**
10 mál á skránni, millum annað frágreiðing frá NMF fundi.
MF er biðið at umhugsa limaskap í FICT. Hettar er evropeiskur felagsskapur fyri yvirmenn innan transportvinnu. PH segði, at møguleiki er fyri at fáa munandi ávirkan innan sjóvinnu, tí bert Hollendingar og Norðurlendingar sýna áhuga fyri hesum innan FICT.
MF tekur undir við at felagsskapurin hjá manningarfeløgunum, verður nevndur Faroese Maritime Unions, stutt FMU. Endamáli er at gera sáttmálar fyri FAS skip.
Mál, sum eru til viðgerðar í Sjóvinnuráðnum vóru eisini viðgjørd.
Samtykt varð, at halda aðalfund leygardagin 6. mars 2010

**2. november: MF**
Fundur við starvsfólk hjá Lív. MF greiddi frá síni ónøgd um brøv, sum nakrir limir høvdu fingið frá Lív. Lív segði, at hetta var eitt óheld og at tað ikki skuldi endurtaka seg.

**12. november: HAK**
Fundur um samanskriving av sáttmálum við Fíggjarmálaráðið.
Endamálið er at fáa allar sáttmálarnar at líkjast meira.

**14. november: FSN**
Blaðfundur um fjórðu útgávu av Mið og Magn

**16. november: Skrivstovan hjá Turið Deebes Hentze**
Val av semingsfólkunum; Regin umboðar MF í hesum bólki.

**16. november: Fiskimálaráðið**
Manningarfeløgini fund við Landsstýrismannin um tilbúgving á sjónum.

**16. november: Fiskimálaráðið**
Arbeiðsbólkurin til at gera tilmæli um inntøkutrygd hevur sín triðja fund.

**17. november: Havstovan**
Kanning av oljunýtslu hjá føroyskum fiskiskipum.
Felagið hevur ynskt at luttaka í stýrisbólki í sambandi við hesa ætlan, og metir, at tað er gott, at stig verður tikið til at kanna og skráseta verandi støðu, so at tað fæst grundarlag til at seta tiltøk í verk, sum kunnu tálma oljunýtsluna.
Meira kann lesast á www e-fishing.eu

**20. november: MF Nevndarfundur**
11 mál á skránni, m.a. uppsøgn av staðbundnum avtalum og aðrar broytingar hjá SSL. Sáttmálasamráðingar við Furetankers.

**23. november: MF**
Fundur millum MF, FSN og Starvsmannafelagið.
Til viðgerðar staðbundnar avtalur hjá SSL. Feløgini samdust um ikki at gera nýggjar staðbundnar avtalur.

**25. november: Føroyaprent**
Mið og Magn fundur um at fáa blaðið prenta hjá Føroyaprent framyvir.

**26. november: FSN**
Blaðfundur um fjórðu útgávu av Mið og Magn.

**1. desember: Fiskimálaráðið**
Arbeiðsbólkurin til at gera tilmæli um inntøkutrygd, hevur sín fjórða fund.

**2. desember: MF**
Framløga av kanning av sjófólki uttanlands. Kanningin kann lesast á heimasíðuni hjá MF.

**14. desember: Portugálið**
Fundur í Sjóvinnuráðnum um tvey kærumál.
Annað um framtøkumegi; hitt um manningarásetan.

**15. desember: Sandsølan; Runavík**
Undirskriva sáttmála millum MF og Sandsøluna.
Sáttmálin kann lesast á heimasíðuni

**15. desember: Sandgrevstur; Fuglafjørður**



Undirskriva sáttmála millum MF og Sandgrevstur.
Sáttmálin kann lesast á heima síðuni

**16. desember: FSN**
Blaðfundur um fjórðu útgávu av Mið og Magn.

**17. desember: Nevndarfundur**
9 mál á skránni m.a. sáttmálaviðurskifti við SSL, og yvirtíð hjá SSL
Umrødd vóru eisini útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum og hølisviðurskifti.

**Maskinistar**
Tað gleðir okkum, at tað nú aftur verða tiknir maskinistar inn á skúlan, og tað er okkara vón, at tað framyvir verða tiknir maskinistar inn eina ferð árliga.
Hendan útbúgvingin er sum skraddaraseymað til tann føroyska flotan, vit meta at tað er tørvur á maskinistum í okkara høvuðsvinnu.
Útbúgvingin er eisini sera væl egna til farmaskip við maskinorku upp til 3000 KW. Vónandi fáa vit fleiri skip inn í FAS við hesi stødd, og har við arbeiðið til fleiri maskinistar.

# Tíðindi frá Føroya Skipara-

**Eyðstein Djurhuus:**

## Eitt nýtt 10 ára skeið

Hetta ársskiftið var eisini byrjanin uppá eitt nýtt 10 ára skeið. So kann ein spyrja, hvat er broytt innan okkara øki, síðan ár 2000 og hvat kunnu vit vænta fram til 2020.

Meginparturin av okkara fiskiflota er enn ótíðarhóskandi, og somuleiðis stríðast vit við lágum fiskaprísum, lítlum fiskiskapi og stórari skuldarbinding. Skipatalið minkar og illa gongst við endurnýgging av flotanum.

Eitt dømi er rækjuflotin, sum er minkaður niður í bara trý skip. Vit kunnu tó fegnast um, at inntøkurnar hjá rækjuskipunum eru batnaðar, nú hvørt skipið hevur betri veiðimøguleikar.

Hetta er ein gongd, sum sæst í fleiri skipabólkum. Skipini gerast færri og somuleiðis størvini. Men fleiri skip hava í dag skiftismanningar, so okkara limatal er ikki lækkað eins nógv og skipatalið. Ein fortreyt fyri skiftismanning við fiskiskipum er, at skipið er í regluligari vinnu og, at veiðan fyri árið er hampiliga góð.

Nótaflotin og flakatrolarar eru komnir í eina kapping um sama tilfeingið. FSN kann ikki taka støðu til, um vit skulu velja okkara egna svartkjaft fram um tosk og hýsu eystanfyri. Vit hava jú limir í báðum veiðibólkunum.

Innan heimaflotan tosa politikarar nú um ein fiskivinnureform, sum skal bøta um lønsemi og gera vinnuna burðardygga. Hetta ljóðar sera skilagott, men skynsemi skal eisini brúkast. Kollvelting og reformur er ikki tað sama. Kollvelting knúsar alt niður, fyri síðan at byggja uppaftur. Reformar eiga, at brúkast til at fremja nátturligar tillagingar og moderniseringar.



*Eyðstein Djurhuus, avmyndaður til prógvhandan á Vinnuháskúlanum, har hann fluttið fram røðu.*

Allarhelst er neyðugt við broytingum, á fleiri økjum næstu árini. FSN fer at viðvirka til skilagóðar broytingar, men vit taka frástøðu frá kollveltingar metodini.

## Føðingardagar hjá limum okkara

| | | |
|---|---|---|
| Magnus Justesen | 14. februar 1920 | 90 ár |
| Jákup á Rógvi | 26. januar 1940 | 70 ár |
| Johan Michael Strøm | 1. mars 1940 | 70 ár |
| Brandur Joensen | 8. januar 1950 | 60 ár |
| Símun (y) Thomsen | 12. januar 1950 | 60 ár |
| Eyðfinnur M. Olsen | 16. januar 1950 | 60 ár |
| Torleif Samuelsen | 20. januar 1950 | 60 ár |
| Gardar Joensen | 26. januar 1950 | 60 ár |
| Zakaris S. Zachariasen | 1. mars 1950 | 60 ár |
| Sigurd Johannesen | 5. mars 1950 | 60 ár |
| Annfinn Mortensen | 26. mars 1950 | 60 ár |
| Rólant Poulsen | 31. mars 1950 | 60 ár |
| Edmund Nielsen | 3. januar 1960 | 50 ár |
| Óli Joensen | 3. februar 1960 | 50 ár |
| Klæmint Hansen | 5. februar 1960 | 50 ár |
| Leivur Ryggshamar | 25. februar 1960 | 50 ár |
| Høgni Debess | 9. mars 1960 | 50 ár |
| Evald Fróði Sólvitsson | 11. mars 1960 | 50 ár |
| Henning Niclasen | 16. mars 1960 | 50 ár |
| Magnus Olsen | 23. mars 1960 | 50 ár |
| Johan A. Hansen | 3. mars 1960 | 50 ár |
| Jóhan E. Fuglø | 14. apríl 1970 | 40 ár |
| Sofus Valbjørn Jóhan Lognberg | 24. apríl 1970 | 40 ár |

# Brot úr dagbókini hjá Skipara- og Navigatørfelagnum

**7. – 9. oktober: Århus**
Norðurlendska Navigatørkongressin; ein skipsførarnæmingur var eisini við. Viljálmur Gregoriussen umboðaði Føroyar við Trygdarseminari, sum er fastur partur av heystfundinum hjá Kongressini.

**13. oktober: FSN**
Blaðnevndarfundur.

**20. oktober: Fiskimálaráðið**
Fundur í Fiskivinnuráðnum, til viðgerar var uppskot um broytingar í § 19 í lógini um vinnuligan fiskiskap. Hetta eru reglur um avreiðing uttanlands.

**26. oktober: Advokatvirkið**
Fyrireiking av gerðarættarmáli.

**27. oktober: FSN**
Fundur við Christian Andreassen adv. um kæru til Løgtingsins Umboðsmann.

**2. november: Jarðfeingi**
Nevndarfundur í Maritimum Forum. Arni Poulsen frá Vinnumálaráðnum greiðir frá um arbeiði, at orða ein sjóferðslu politikk.

**5. november: Norðurlandahúsið**
Betri Pensjón skipar fyri temakvøldi um ymisk pensjónsviðuskifti.

**9. november: Hotell Føroyar**
Fíggjarmálaráðið og politiski fylgibólkurin kunnar fakfeløgini um pensjónsreformin. Vit fingu váttan fyri, at ein serskipan skal gerast fyri FAS inntøkur.

**10. november: Kongabrúgvin**
Fundur við Lív um hættisliga sjúku hjá einum limi.

**12. november:**
**Havnar Arbeiðskvinnufelag**
Fundur millum fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum, um saman-skriving av sáttmálunum.

**13. november: FSN**
Fundur í blaðnevndini.

**16. november: Turid D. Henze**
Val av semingsmonnum

**16. november: Fiskimálaráðið**
Arbeiðsbólkurin viðvíkjandi inntøkutrygdini hevur fund. Mannningarfeløgini og Reiðarafelagið hitta Jacob Vestergaard. Tosað verður um, hvat kann gerast fyri at bøta um tilbúgving og bjarging á sjónum. Fundurin varð fingin í lag eftir vanlukkuna umborð á Polarhav.

**23. november:**
**Maskinmeistarafelagið**
Fundur millum FSN, MF og Starvsmannafelagið um ætlaðar sparingar hjá Strandferðsluni. Eitt felags svar verður givið, har vit boða frá, at vit góðtaka ongar broytingar.

**25. november: Føroyaprent**
Blaðnevndin vitjar prentsmiðjuna.

**26. november: FSN**
Endalig fyrireiking av málsviðgerð í Fasta Gerðarrættinum.

**26. november: MIÐ & MAGN**
Blaðnevndarfundur

**30. november: Fiskimálaráðið**
Arbeiðsbólkurin um inntøkutrygdina hevur fund. Fiskimannafelagið boðar skrivliga frá, at teir vilja ikki vera við til nakrar broytingar, sum kosta limum teirra nakað. Tað er óvist um nakað endamál er í at halda fram í hesum arbeiðsbólki.

**1. desember: ALS bygningurin við Tinghúsvegin**
FSN og Reiðarafelagið Fyri Farmaskip eru í Fasta Gerðarrættinum við eini sáttmálatulking.

**1. desember:**
**Maskinmeistarafelagið**
Granskingarverkætlanin um sjómenn við útlendskum skipum verður løgd fram.

**3. desember: Vinnuháskúlin**
Formaðurin í FSN greiðir næmingunum frá um sáttmálan fyri fiskiskip. Áhugavert orðskifti var um, hvat hesir ungu menn forvanta sær av sáttmálum í framtíðini.

**3. desember: Dómhúsið**
Sjófrágreiðing um vanlukkuna umborð á Polarhav.

**14. desember: Portugálið**
Sjóvinnuráðið ger endaliga niðurstøðu í tveimum kærum um manningarskjøl.

**15. desember: Hotell Hafnia**
Fiskimálaráðið kunnar vinnuna um nýggj ES krøv, um váttan fyri, at fiskurin er veiddur lógliga. Stór ósemja var um verandi sporførisskipan kann útskriva hesa váttan ella um Fiskimálaráðið skal menna eina nýggja skipan saman við sínum KT veitara.

**16. desember: FSN**
Nevdarfundur; til viðgerðar var millum annað roknskapurin og fyrireiking av aðalfundi.

**16. desember: MIÐ & MAGN**
Blaðnevndarfundur

**18. desember: Vinnuháskúlin**
Prógvhandan.

**21. desember: Jarðfeingið**
Maritimt Forum, fundur.

**29. desember: Hotell Tórshavn**
Aðalfundur og nevndarfundur.

# Nú er ferð komin á søluna

*Tekstur: Ingi Samuelsen*

Hóast tað gongur spakuliga, so gongur tað spakuliga tann rætta vegin fyri fyritøkuna Faroe Maritime Technic í Vági.

Fyritøkan selir og mennir oljuskiljiskipanina, sum maskinmeistarin Kaj Joensen hevur uppfunnið. Eftirspurningur eftir „oljusleikjaranum" veksur alsamt.

Í seinasta Mið & Magn skrivaðu vit um uppfinningina í sambandi við, at fyrsta veruliga skipanin var seld og sett í vaktarskipið Tjaldrið við góðum royndum.

Í heyst var Kaj Joensen á stórari fiskivinnumessu í Aalborg, Danmark, har stórur áhugi var fyri skipanini.

Enn hevur tað ikki eydnast at selt skipanina uttan fyri Føroyar, men okkurt bendir á, at tað nú bara er ein spurningur um tíð.

Kaj Joensen hevur higartil selt tríggjar skipanir umframt ta fyrstu til Tjaldrið. Eina til Strandfafaskip Landsins, ið skal setast umborð á Ternuna, eina til Enniberg og eina til trolaran Athena hjá Thor í Hósvík.

Skipanin til Enniberg er ísett og farin at virka, meðan oljuskiljarin til Athena skal fraktast hálvan veg kring jørðina til Kina, har stóri trolarin verður umvældur eftir umfatandi brandskaða. Kaj Joensen ætlar sær sjálvur við til Kina fyri at tryggja sær, at skiljarin verður rætt monteraður.

– Eg fegnist um, at áhugin er stórur, sjálvt um tað ikki enn er krav um at hava slíkar skipanir umborð. Nú vóni eg, at royndirnar við hesum skiljarunum verða so góðar, at enn fleiri skip vísa áhuga, sigur Kaj Joensen.

Sølustevnan í Aalborg gav ikki nakran beinleiðis ordra, men áhugin frá útlendskum feløgum var til staðar, og nógvir gestir vitjaðu básin hjá Faroe Maritime Technic.

– Millum annað var eitt rættiliga stórt danskt virki, sum vísti og framvegis vísir áhuga. Um tað eydnast okkum at fáa avtalu við ein so stóran kunda, so sær alt knappliga nógv øðrvísi út fyri okkara fyritøku, og vit skulu til at endurskoða framleiðsluna, sigur Kaj Joensen.

Í løtuni eru tað ymiskir veitarar, ið lata deilirnar til skipanina, og Kaj Joensen monterar sjálvur.




# Vit bera út fyri títt virki



**Bløð**
**Tíðarrit**
**Reklamur**
**Pakkar**

Tit ringja og vit koma.
Er tað koyrandi, koma vit til títt virki
eftir tí sum berast skal.

**Bera :)** ring 76 76 76




Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

*- so ert tú tryggari*